Limablað nr. 8 • 2023

# Eldri

Landsfelag Pensjónista



ELDRADAGUR Í DANSIFRØI

ALMA PETERSEN 90 ÁR

DREYMASTARV SUM FRISØR

**Blaðið Eldri**

Einaferð um árið gevur Landsfelag Pensjónista út blaðið Eldri. Endamálið við blaðnum er at kunna pensjónistar og onnur um ymiskt, ið áhugavert er hjá eldri, heima sum uttanlanda, at lesa.

**www.eldri.fo**

**Ábyrgd**
Beate L. Samuelsen, forkvinna

**Samskipari**
Gunnleyg Durhuus, skrivari og samskipari

**Umbróting**
Grafikmaster / Kári við Rættará

**Prent**
Føroyaprent

**Landsfelag Pensjónista**

Landsfelag Pensjónista er felag fyri allar pensjónistar og øll eldri í Føroyum. Limir í Landsfelagnum eru pensjónistafeløg og eldrafeløg í Føroyum. Landsfelagið hevur til endamáls at arbeiða fyri fíggjarligum, sosialum, mentanarligum og øllum øðrum áhugamálum pensjónista.

**Landsfelag Pensjónista**
**Løkjatún 1,**
**FO-160 Argir**
**Tel: 21 93 94**
**T-postur: lp@eldri.fo**
**Heimasíða: www.eldri.fo**

# INNIHALDSYVIRLIT

NEVNDIN ........ 3
PÚRGAÐIR PENSJÓNISTAR ........ 4
ANDAKT ........ 6
GÓÐ HEILSA KREVST AT ARBEIÐA SUM FRISØR ........ 9
ELDRADAGUR Í DANSIFRØI ........ 14
KLEYNU- OG SMÁKØKUUPPSKRIFTIR ........ 19
Á KÓRSGÁTTINI ........ 20
ALMA PETERSEN 90 ÁR ........ 27
HJÚNASKILNAÐIR Í 18. OG 19. ØLD ........ 30
ELDRI OG VEÐURLAGSBROYTINGAR ........ 36
LÍTIL OG ONGIN SKATTALÆTTI TIL PENSJÓNISTAR ........ 38
VITJAN HJÁ ELDRAFELAGNUM VESTURSKIN ........ 40
NORÐURLENDSK ELDRAFELØG GLEFSA FRÁ SÆR ........ 42
ÁRSFRÁGREIÐING 2022-2023 ........ 45
AVSLÁTTARAVTALUR ........ 51
PENSJÓNISTA- OG ELDRAFELØG Í FØROYUM ........ 54

# LANDSFELAG PENSJÓNISTA HEVÐI AÐALFUND 29. APRÍL 2023



Aftur í ár vóru nógv fólk á aðafundinum hjá Landsfelag Pensjónista, ið var hildin á Hotel Hafnia 29. apríl.

Forkvinnan Beate L. Samuelsen beyð vælkomin og legði ársfrágreiðingina fram. Fleiri tóku orðið og gott kjak var um ymisk evni á fundinum.

Á skránni var m.a. nevndarval, har tríggir nevndarlimir stóðu fyri vali og tríggir varalimir.

Í nevndina vóru vald: Beate L. Samuelsen, Pensionistafelagið í Havn, Ingeborg Vinther, Pensjónistafelagið í sunnaru helvt av Suðuroy og Alfred Olsen, Eldrafelagið á Toftum.

Sum varalimir vóru vald:, Erhard Jacobsen, Vága Pensjónistafelag, Elna Lamhauge Strøm, Pensionistafelagið í Havn  og Annvør Jacobsen, Eldrafelagið á Eiði.

**Aftaná aðalfundin skipaði nevndin seg soleiðis:**

Beate L. Samuelsen, forkvinna
Ingeborg Vinther, næstforkvinna
Alfred Olsen, nevndarlimur
Hans Jacob á Kósini, nevndarlimur
Jákup Andreasen, nevndarlimur

# Leiðarin:
# Púrgaðir pensjónistar

**Vilja vit sum pensjónistar rætta eina hjálpandi hond, verða vit knokkroyttir fíggjarliga, um vit ikki ansa eftir**

***Tekstur: Beate L. Samuelsen***

Alt sær ikki so "ljósareytt" út, tá mál viðvíkjandi pensjónistum skulu viðgerast á hægstu politisku rók. Undan einum løgtingsvali er einki ófført, tá tað snýr seg um okkum. Men í somu løtu høvi er hjá politikarum at halda fast við hálovaðu lyftini, kunnu vit líka so skjótt skjóta ein "hvítan" píl eftir hesum lyftum.

Við hesum verður hugsað um lyftini um hækkaða fólkapensjón, sum slett ikki fylgir prísvøkstrinum, og mótrokning av fólkapensjónini í sambandi við arbeiðsinntøku.

Tá til stykkis kom, og løgtingsuppskotið um mótrokning kom til 2. viðgerð í løgtinginum 2. mai 2023, fall uppskotið burtur við brestin. Spell.

Sum Landsfelag Pensjónista høvdu vit eina vón um, at uppskotið fór at verða samtykt, um ikki 100 pst., so í minsta lagið við einum meiriluti av okkara fólkavaldu.

## Púrgaðir pensjónistar

Tað kann ikki verða so trupult at síggja virðið í meiningini at lata fólk, rokkin tey 67 árini, sleppa at brúka ta orku, vit meta okkum at hava til frama fyri okkara samfelag. Tað kemst av, at her snýr tað seg um pensjónistar, ið farnir eru av arbeiðsmarknaðinum vegna aldur, og pensjónistar, ið fegnir vilja hjálpa til í samfelag okkara, nú fyritøkur og stovnar skríggja eftir arbeiðsmegi.

Almenn tøl hesum viðvíkjandi finnast ikki. Dag og dagliga venda júst hesir pensjónistar sær til Landsfelag Pensjónista. Teir kæra sína neyð, at teir bókstaviliga verða púrgaðir fyri eyka skatt, tí teir árið fyri hava verið so "frekir" at hava arbeitt ov nógv. Pensjónistar hava ongan áhuga at snýta samfelagið og geva við somu orsøkum alt, sum vunnið verður, upp í skatti. Sambært politikarum hava vit sum pensjónistar einki at kæra okkum um, tá tað kemur til tað fíggjarliga.

Nú skulu pensjónistar og makarnir "saft súse meg" sleppa at merkja á pengamappuni, at tað



ikki kann betala seg at verða verandi á arbeiðsmarknaðinum, og missa tískil øll ískoyti, vit annars hava rættindi til. Vit skulu revsast fyri at ditta okkum at vinna ov nógvan pening aftrat pensjónini, og fáa vit tí eina feita eyka skattarokning árið eftir, sum peningurin er vunnin. Upphæddin skal gjaldast her og nú, ella eisini í mesta lagið við trimum avdrøgum, eru boðini frá myndugleikunum.

Einki nyttar at kæra sína neyð. Allar kærur hesum viðvíkjandi til almennar stovnar so sum til Taks og Almannaverkið verða vendar í hurðini. Har verður víst til lógina. Og tað er tað.

Eftir standa vit sum pensjónistar við skegginum í postkassanum, vit, sum framvegis hava hug og orku at tæna samfelagnum, so sum vit altíð hava gjørt.

## Tað gráa gullið

Okkara aldursbólkur hevur fleiri eyknevni, m.a. "Eldrabyrðan" og "Tað gráa gullið".

Hetta eru rámandi orð, men vit mugu undir ongum umstøðum gloyma tann partin av eldri fólki, sum ikki kann klára seg sjálvi, og sum framvegis búgva heima. Vit mugu heldur ikki gloyma tey okkara, sum eru komin á ein góðan ansingarstovn, antin til umlætting ella til ein verandi bústað.

Júst har, loypir ketan av. Tí millum pensjónistar eru fleiri, sum hava drúgvar royndir innan ábyrgdarfult arbeiði, og sum fegnir vilja rætta eina hjálpandi hond innan eldraøkið, tá á stendur við eyka vaktum o.l.

Arbeiðshugurin uttanfyri heimið minkar, tá man er komin á eldralandsliðið og verður knokkroyttur í eyka skatti, og m.a. missir ískoytir í sambandi við fólkapensjónina.

Í Danmark hava politikararnir skilt boðskapin hjá pensjónistum.

Í ár strikaði Fólkatingið alt, sum eitur mótrokning í samband við arbeiðsinntøku, ið pensjónistar vinna útyvir fólkapensjónina. Har verður eykainntøkan nú skattað sum vanlig løn. Sjálvandi.

Landsfelag Pensjónista vil ikki sleppa hesum sama kravi.

Felagið heldur fram við at krevja mótrokningina strikaða.



# KOMIÐ ALT ER TILGJØRT

*Tekstur: Hanus á Gørðum, sóknarprestur*

**Tað var ein maður, sum gjørdi eina stóra kvøldmáltíð og beyð mongum; og hann sendi út húskall sín um ta tíðina, tá ið kvøldmáltíðin skuldi verða hildin, at siga við teir, ið bodnir vóru: "Komið, tí at nú er alt tilgjørt!" Men teir fóru allir sum ein at umbera seg. Hin fyrsti segði: "Eg havi keypt nakra jørð, og eg noyðist at fara út og hyggja at henni; eg biði teg halda mær til góða!" Og annar segði: "Eg havi keypt fimm pør av oksum og fari nú út at royna teir; eg biði teg halda mær til góða!" Og uppaftur ein annar segði: "Eg eri beint nú giftur, og tí kann eg ikki koma." Og húskallurin kom og segði harra sínum frá hesum. Tá varð húsbóndin vreiður og segði við húskallin: "Skunda tær og far út um gøtur og stræti í staðinum, og leið inn higar fátæk og krypplingar og blind og hølt." Og húskallurin segði: "Harri, gjørt er, sum tú skipaði fyri, og enn er rúm." Tá segði húsbóndin við húskallin: "Far út á bygdavegirnar og út at gørðunum, og noyð tey at koma inn, fyri at hús mítt kann verða fult. Tí at eg sigi tykkum, at eingin av teimum monnum, ið bodnir vóru, skal smakka kvøldmáltíð mína." Luk. 14,17-24**

Tá ið grundarsteinurin undir Christianskirkjuni í Klaksvík varð lagdur í 1961, segði arkitekturin Peter Koch, at sær altíð hevði tikið synd í teim villu djórunum í einum djóragarði og hevði hug at sleppa teimum leysum. Somu kenslu hevði hann fyri altartalvuna eftir Joakim Skovgaard, tá ið hann sá hana á listasavninum í Keypmannahavn. Hann var fegin um at kunna veita henni eina virðiligari tilveru í Christianskirkjuni.

Altartalvan ber heitið: Hin heilaga kvøldmáltíðin. Á altarmyndini síggjast høgtíðar klæddir tænarar í reyðum kappum. Kærleikans og lívsins heiti litur. Innbjóðingin fór fyrst út til nøkur útvald, og tey byrjaðu at umbera seg, tað var nakað, ið hevði hægri raðfesting. Ein var akkurát giftur, annar hevði keypt jørð og hin triði hevði keypt 5 pør av oksum. Hvørjar kunnu okkara



umberingar vera í dag fyri at takka nei til innbjóðingina til Guds ríki? Vit hava kanska ikki stundir, eg skal náa so nógv, tíðin røkkur ikki til. Tað kunnu eisini vera umstøður, ið hava sárað teg, ein er vorðin firtin, skuffað inn á onkran í kristiligum samanhangi, ella av Gudi sjávum. Ella er grundin sera einføld: Kristna trúgvin sigur mær ikki so nógv. Eg hvíli í mær sjálvum. Við hesum seta tey seg uttanfyri Guds ríki.

Tá ið tey, ið boðin vóru, takkaðu nei til innbjóðingina, fara aðrir tænarar út at bjóða fátækum, kryplingum, blindum og høltum og leiða tey til háborðs. Tey koma øll somul inn í gildisskálan, har Kristus, eisini ílatin reyðum kappa, stendur við útrættum ørmum og bjóðar teimum vesalu og neyðarsligu til borðs. Gestirnir eta og drekka, og tænararnir ganga teimum til handa.

***Altartalvan ber heitið: Hin heilaga kvøldmáltíðin.***

Innbjóðingin er til øll menniskju. Gud letur dyrnar til sítt ríkið uppá víðan vegg. Her eru øll vælkomin, øll uttan undantak. Ikki verður spurt eftir førleikum ella tign, eingin váttan, ið skal prógva ávísan aldur. Kristus hevur eittans ynski, at vit koma. "Tann, sum kemur til mín, vil eg als ikki reka burtur." (Jóh. 6,37) Tann, sum leitar til Jesus, finnur hvíld, frið og náði, tí Jesus sigur: "Verðið í mær so verði eg eisini í tykkum" (Jóh. 15,4).

Skovgaard Pedersen fyrrverandi dómpróstur, segði soleiðis, tá ið hann sum 86 ára gamal steig á prædikustólin:" Eg merki væl, at eg eri vorðin gamal, og megin ikki er hin sama. Tað er ikki nógv, eg orki longur. Júst tí er tað vorðið eitt so lívsælt evangelium fyri meg hesi orð - ver í mær, tí tað kunnu vit øll, eisini vit, sum ikki orka so nógv, sum vit kundu ynskt. At vera í honum kunnu vit øll, heilt frá nýføðinginum í vægguni til tann avgamla. At vera, liva í Jesusi, tað er evangeliið fyri meg.

***Amen.***



***Ása Joensen, hárfríðkanarkvinna***

*Mynd: Kári við Rættará*

# TAÐ KREVUR GÓÐA HEILSU AT ARBEIÐA SUM FRISØR

**Ása Joensen var bara 15 ára gomul, tá hon fór í læru sum frisør. Hon starvast enn í hesum yrki á egnari salong, og sum pensjónistur leggur hon sjálvandi dagarnar til rættis, sum tað passar henni.**

*Tekstur: Beate L. Samuelsen*

Fyri tað um tú hevur rokkið pensjónsaldur, er tað ikki tað sama sum at tú nú bara kann leggja teg á hina liðina og hyggja í sjónvarp restina av lívinum.

Nógvir pensjónistar bæði tíma, orka og hava hug at halda fram í sama starvi, sum teir hava havt frá tí, teir fóru úr skúlanum. Teir hava absolutt ongan áhuga at sleppa lívsstarvi sínum uppá fjall frá einum degi til annan. Er hetta gjørligt og ber tað til, halda teir fram í yrkinum soleiðis, sum teir altíð hava gjørt. Eingin broyting hendir í gerandisdegi teirra, um heilsan og aðrar umstøður annars eru góðar.

Men tað ber ikki til hjá øllum. Verri enn so. Nógv fólk gleða seg til dagin, tá tey fylla 67 ár. Tá er gott endiliga at sleppa at gerast pensjónistur, taka sær av løttum, gera tað, ein hevur hug til og annars fáast við okkurt ítriv.

## Rendi á hárturkihjálmarnar

Ein teirra, sum framvegis arbeiðir soleiðis, sum hon altíð hevur gjørt, síðani hon var tannáringur, er Ása Joensen úr Havn. Hon er frisør og arbeiðir enn í hesum faki. Hon avger sjálv, hvussu hon leggur arbeiðið til rættis.

Ása var bara 15 ára gomul, tá hon fór í læru sum frisørlærlingur hjá hárfríðkanarkvinnuni Oddvør Jacobsen, sum um hetta mundi hevði salong beint yvirav einum av størstu matvøruhandlunum í Havnini, Smæruni, í J. H. Schrøtersgøtu.

Tað var 15. november 1962.

"Eg minnist, at eg hevði keypt mær ein nýggjan kittil, sum eg fór í, og eina spildurnýggjar tuflur".

"Eg var ikki von at ganga í tuflum, so fyrstu dagarnar rendi eg meg í heilum á allar

hárturkihjálmarnar, sum stóðu ymsastaðni á gólvinum í tí lítlu frisørsalongini hjá Oddvør", sigur Ása og minnist flennandi aftur á teir fyrstu dagarnar sum frisørlærlingur.

## Eitt strævið arbeiði

At arbeiða sum frisør er mangan eitt ynskistarv hjá nógvum gentum. Eisini dreingjum dáma hetta arbeiði, bæði á damusalongum og á harraklippistovum.

At hetta er eitt sera strævið og krevjandi arbeiði, hugsa vit onnur kanska ikki so nógv um. Men tað er tað. Tú skalt hava eina góða heilsu at standa uppi ein heilan dag og arbeiða við báðum ørmum upp í loft.

Tú skal verða sterkur, hava sterk bein, sterkar føtur, sterkar armar og rættan kropsburð. Hevur tú ikki tað, gongur tað eftir fáum árum út yvir heilsuna.

Tú fært ilt í armar og nakka, og giktin tekur yvir. Høvuðpína kann gerast tín fylgisveinur restina av lívinum. Hendur og fingrar verða ovbyrjað av saksi og klipping.

Somuleiðis skalt tú fáast við alskyns sløg av tilfari, ið hoyrir fakinum til. Nógv av hesum kann vera orsøk til ovurviðkvæmi, sum tú ongantíð sleppur av aftur við.

Serliga var hetta ein stórur trupulleiki fyrr. Tann sera sterka permanentveskan, sum fór illa við hárbotninum og hárinum. Tøttu purlurnar skuldu helst halda í nakrar mánaðir. Konurnar sóu heldur sólbrendar út, tá tær



einaferð eftir langa tíð undir hitahjálminum, komu sveittandi og blásandi undan aftur. Reyðar í andliti og brendar í hárbotni.
Men hvat ger man ikki fyri vakurleikan? Í dag er alt tilfar meiri húð- og umhvørvisvinarligt.

## Dreymastarv

Starvið sum frisørur er eitt ynskistarv fyri tann, sum veruliga brennir fyri tí. Tú kemur at kenna nógv fólk.

Øll, sum seta seg í frisørstólin, koma har fyri at verða snollað um høvdið. Tað kann vera ein avbjóðing saman við kundanum at finna fram til røttu frisuruna og rætta hárlitin, sum skal passa til og rigga til tína persónligheit.



*"Starvið sum frisørur er eitt ynskistarv fyri tann, sum veruliga brennir fyri tí", sigur Ása Joensen*

*Mynd: Kári við Rættará*

Kundin vil fegin broyta sítt gamla "look" til eitt nýtt. Skal man lata fruntin venda henda vegin ella hin vegin? Ella skal hann kunnast snara báðar vegir? Og hvussu við hárlongdini?

Ynskir myrkhærda kvinnan nú at broyta hárlit til ein annan, ella kundi hon hugsað sær at blivið ein blondina. Næstan alt ber til.  Spurningurin er so, um ynskið um frisurubroytingina klæðir kvinnuni og hennara útstráling? Tað er jú ikki altíð, at eitt tílíkt ynski júst er tað rætta, mett út frá samlaðu heildini sum henni sum persón. Skal man sum frisørur og vegleiðari tora at siga, at hatta fer ikki at rigga og heldur siga bart út, at man heldur átti at roynt okkurt annað?

## Brúður og mótasýning

Sum lærlingur lærir man, hvussu berast skal at. Man lærir at tosa við kundan og í felag finna útav, hvønn veg miðast skal fram ímóti einum hóskandi úrsliti.

Ein frisørlærlingur lærir ikki bara alt um hár og hárkvalitet, men hann lærir eisini at sminka kundum og ordna negl. Eygnabrýr og -vippur skulu eisini litast. Alt skal rigga.

Kundin skal kanska í nýggjan kjóla, ið longu er keyptur ella seymaður til eina serliga veitslu. Hárlitur, snið og tað heila skal hóska saman og ganga upp í eina eind, soleiðis at kvinnan "sær út sum ein millión".



"Slíkar uppgávur eru sera spennandi og avbjóðandi at vera við til", sigur Ása Joensen, og tað er óivað tað, sum ger, at nógvar gentur fegnar vilja verða frisørar.

Sjálv letur hon ikki kundan fara heim, fyrr enn báðir partar eru nøgdir.

Mest spennandi uppgávan er at pynta brúður og síggja, hvussu kvinnan á brúdleypsdegi hennara eftir nøkrum tímum broytist frá at vera ein vanlig genta til eina "stíl sikra" drotning í øllum sínum brúðarskrúð. Í góðari tíð frammanundan hava frisørur og komandi brúðurin kanska tosað um, hvussu frisuran skal vera brúdleypsdagin. Kanska skal brúðurin lata hárið veksa eitt sindur aftrat, so tað verður lættari at fáast við.

"Alt skal verða perfekt og sita, sum tað skal. Ikki minst hárið, tá slørið er sett uppá pláss", upplýsir Ása smílandi, tá hon hugsar um tær mongu brúðrar, hon millum ár og dag hevur pyntað á stóra degi teirra.

"At síggja eina vakra brúður ganga inn eftir kirkjugólvinum t.d. er ein sera, sera góð kensla, tá man veit, at man hevur verið við til at pynta hana".

Ása hevur eisini luttikið "backstage" á mongum mótasýningum. Hon hevur mangan verið við til at syrgja fyri frisuruni hjá teimum, sum hava gingið modell, soleiðis, at hárið skuldi sita perfekt, hvørja ferð tey við fúkandi ferð hava skift klæðir.

"Tað er ordiliga stuttligt", sigur hon.

## Rættur kropsburður

Arbeiðið sum frisør krevur, at tú stendur uppi allan dagin. Til ber at sita á einum hóskandi krakki av og á, meðan tú klippir. Men tað krevur sanniliga eisini nógv av tær at sita og klippa, tí tú skalt hava rættan kropsburð.

Tað er ein orsøkin til, at frisørar mugu hugsa um heilsuna t.d. íðka fimleik ella venja onkra ítrótt fyri ikki at gerast óarbeiðsførir á so ungum aldri.

"Tíbetur havi eg gjøgnum alt mítt meiri enn 60 ára langa lív innan frisøryrkið verið so heppin at havt møguleikan at fingið undirvísing í Mensendieck-fimleiki", sigur Ása Joensen.

"Mensendieck eigur lívið í mær, soleiðis at skilja, at um eg ikki ein tíma hvørja viku øll hesi árini hevði fingið undirvísing í hesum fimleiki, hevði staðið illa til hjá mær".

## Giktin má víkja

Uttan Mensendieck-fimleik hevði Ása rætt og slætt ikki verið før fyri at arbeitt innan frisøryrkið øll hesi árini.

"Við javnan at venja Mensendieck havi eg lært at brúka rygg, vøddar og liðir rætt, soleiðis at eg ikki gerist óneyðuga móð og troytt í dagliga arbeiðinum".

Og heldur hon fram: "Hetta hevur samstundis gjørt, at giktin, ið frisørar plágast nógv av, verður hildin niðri - og í allar besta føri, slett ikki fær takið á okkum".

Av góðum royndum kann hon viðmæla øllum til at fáa undirvísing í Mensendieck-fimleiki. Í undirvísingini verður atlit tikið til hvønn einstakan. Undirvíst verður ikki í stórum bólkum, men antin einstaklingum ella við heilt fáum luttakarum í senn.

Ása elskar sítt arbeiði og hevur nógv at takka Mensendieck fyri, at hon, ið kom á eldralandsliðið fyri nøkrum árum síðani, framvegis kann arbeiða sum hárfríðkanarkvinna.



# ELDRADAGUR Í DANSIFRØI Í TÓRSHAVN

**Ein sera væleydnaður dagur, har 360 fólk luttóku og hugnaðu sær saman**

*Tekstur: Gunnleyg Durhuus*
*Myndir: Tindra v. Rani Joensen*



*Jógvan Johansen, formaður í Pensionista-felagnum í Havn bjóðaði vælkomin*

Eldradagurin, ið var 9. sept. 2023 í Dansifrøi, Tórshavn, har pensjónistar úr øllum landinum luttóku, eydnaðist sera væl. Stuttligt var at síggja 360 fólk hugna sær saman til eitt slíkt høvi við m.a. at hitta kenningar, ið teir ikki høvdu havt samband við í fleiri ár, og eta ein góðan bita saman.

Dagurin byrjaði kl. 12 við sølu av lutaseðlum og fólk sessaðust við borðið.

Jógvan Johansen, formaður í Pensiónistafelagnum í Havn bjóðaði vælkomin.

Síðan var borðreitt við sera góðum døgurða, køku í kaffisteðginum og smyrjibreyði til nátturða, og stóð kokkurin Ruben Busk fyri allari matgerð saman við hansara mongu dugnaligu tænarum.

Seinnapartin vóru framløgur, sangur, lutaseðlar drignir og føroyskur dansur var eisini.

Tá fólk vóru liðug at eta smyrjibreyð, varð farið upp á gólv, har Róald Johannesen o.o. skipaðu. Forkvinnan í Landsfelag Pensjónista, Beate L. Samuelsen, bar fram heilsan, Jógvan Johansen endaði dagin og sungin varð "Boðar tú til allar tjóðir.



*Ruben Busk, kokkur, greiddi frá matinum, ið gestirnir fingu*







*Til sangirnar undir borðhaldinum spældu Hjalti Skaalum, Eyðfinnur Guðjónsson, Bjarti Skipanes og Milson Zachariasen*



*Fyrsti røðarin var Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu*

*Marin Vang, fyrrv. sjúkrarøktarfrøðingarstjóri, hevði eina áhugaverda hugleiðing um "Lívið sum virkin pensjónistur". Hon hevði nógv góð hugskot til pensjónistar, hvat teir skulu hugsa um, tá teir fara av arbeiðsmarknaðinum, soleiðis at teir framvegis kunnu verða virknir, bara upp á ein øðrvísi hátt.*





Nógv er at práta um, tá man hittist. Her eru Eyðbjørg Kass, Ragnhild A. Petersen (Guggan) og Sólva Dam



Magnus Magnussen, Gekkavertur, segði frá ymsum skemtisøgum og dugdi væl at fáa fólk at flenna



Nógvur látur hoyrdist allan dagin í Dansifrøi. Hjúnini Ketty Norðberg Petersen og Egil Mittún Petersen



Gott prát fór fram undir borðhaldinum. Her eru tað Hilmar Durhuus og hjúnini Hanne og Jógvan Petersen



Durita Hansen greiddi frá um nýggju Skjáttuna hjá Talgildu Føroyum og svaraði spurningum



Gott at hitta kenningar



*Man kann ikki siga annað, enn at lagið var gott.*



*Jákup Petur Eliassen, fysioterapeutur, fekk fólk at røra seg, aftaná at hann hevði hildið eina sera áhugaverda framløgu um týdningin av at venja, og hvat tað ger við kroppin, tá man eldist*



*Fólk dámdu væl at røra seg*



*Ida Winther biður ein av luttakarunum draga ein vinning. Spenningurin var stórur, tá lutaseðlarnir vóru drignir.*





*Ninni Olsen, forkvinna í Pensjónistafelagnum Hugni, Klaksvík, var so heppin at vinna høvuðsvinningin, ið var eitt gávukort frá Smyril Line, ein ferð fyri tvey við bili við Norrönu*



*Óli Breckmann undirhelt við skemti og skrøgg úr gomlu Havnini*



*Eyð A. Gotfred frá Betri Banka, gav eina vegleiðing um, hvussu tú fær sum mest burturúr tí fíggjarliga*

# KLEYNUUPPSKRIFT AV NESI Í VÁGI

*Tekstur: Ingeborg Vinther*



- 1 kg.fínt hveitimjøl
- 200 gr.margarin
- 375 gr.melis
- 8 egg
- 2 tsk.hjortasalt
- 2 gløs kardemummur
- 4 spsk. mjólk.

Rør sukur og margarin væl saman, koyr so egg í og restina av tilfarinum.

Lat deiggið hvíla eina løtu, áðrenn tað verður rullað út og gjørt til kleynur.

Rapsolja er góð til at kóka kleynur í.

## Góðar smákøkur

- 150 gr. smør
- 200 gr. melis
- 100 gr. putursukur
- 2 egg
- 300 gr. fínt hveitimjøl
- 2 tsk. vaniljusukur
- 1 tsk. natron
- 1 tsk. salt
- 200 gr. kókisjokuláta
- 100 gr. Kims peanuts ristaðar og saltaðar.

Sjokulátan skal verða smáttskorin og nøtunar skulu verða heilar.

Alt tilfarið verður blandað saman, og skal setast á plátur við teskeið.

Hav gott pláss millum køkurnar, tí tær flána nakað út.

Bakast við 175 gr.  í 7-8. min. ovaliga í ovninum.

***Góðan bakihug***



# Á kórsgáttini

*Orð og myndir: Erhard Jacobsen*

Fyri nú skjótt nøkrum árum síðan varð eg biðin til dekn í Sørvágs kirkju. Hetta var stutt eftir, at eg var farin á pensjón, og kanska var tað onkur næstingur, sum hevði skotið meg upp, nú tey manglaðu ein dekn. Hon helt ivaleyst, at tað var gott hjá mær, sum ikki eri so útfarandi, at fáa okkurt at tríva í.

Eg hevði satt at siga ikki væntað at verið biðin og hugsaði meg væl um, áðrenn eg játtaði. Ein spurningur var, um eg nú var so gudiligur, um eg kann brúka tað orðið, at eg kundi bjóða meg fram til slíkt álitisstarv? Og var tað ikki ein treyt, at tú trúði tí, sum tú fórt at bera fram í kirkjuni? Annars var tað jú ikki sannførandi!

Nú hoyri eg til tey, sum lærdu faðirvár á barnaárum; ein bøn, sum eg síðan mangan havi biðið. Vit blivu eisini signaði, áðrenn vit fór út at spæla um morgunin ella fóru í skúla. Vit gingu trúgv í sunnudagsskúla, enntá í tveir í Sørvági, tann hjá baptistunum og tann hjá heimamissiónini, og av og á gekk eg eisini í kirkju. Og hóast nógv av hesum varð avlagt, tá ið ungdómsárini komu, so sat okkurt av hesum eftir kortini. Meðan eg umhugsaði meg, fór eg at grunda, um eg nú gjørdi eftir teimum kristiligu boðunum, ella rættari gav teimum nakran ans. Og hetta stóð við eisini, tá ið eg var farin undir deknastarvið.




*Erhard Jacobsen*

## Áminningar

Og lesa vit Bíbliuna, so er hon á tremur við áminningum. Hon kann eitt nú fáa meg at spyrja meg sjálvan: Hví bjóði eg meg ikki fram sum vitjanarvin? Tað átti eg, tí sum tað stendur í Jákupsbrævinum í Nýggja Testamenti, at "ein rein og lýtaleys gudsdýrkan fyri Gudi og faðirinum er hetta: at vitja faðirleys og einkjur í trongd teirra." (Kap. 1, v. 27) Og her kundi eg skoytt uppí eisini at vitja tey eldru ella gomlu, í hvussu er tey, sum ofta sita einsamøll og kanska enntá ikki fáa vitjan av teirra næstu. Og hvat geri eg til tess at bjarga heiminum

undan týningini, sum veðurlagsbroytingarnar fara at hava, og sum vit longu síggja koma? Tað liggur annars væl fyri at spyrja, um kristin skulu bjarga heiminum. Tí fleiristaðni í Bíbliuni verður ávarað ímóti at elska heimin, tí tað dregur ein frá kærleikanum hjá Gudi (Fyrra Jóhannesarbræv kap. 2, v. 15) og í sama versi í Jákupsbrævinum, sum varð endurgivið omanfyri, verður álagt okkum "at varða seg sjálvan óspiltan av heiminum." Tá ið so er, skulu vit so vera líkasæl og bara lata heimin fara upp í royk? Og er tað nóg mikið bara at bjarga sær sjálvum inn um himmiríkis portur? Neyvan er tað so. Og fyri enn einaferð at fara til Jákupsbrævið, so pástendur Jákup, at trúgvin er deyð uttan gerningar.

Í eini grein í tíðarritinum Science í 1967 skrivar søgufrøðingurin Lynn White um leiklutin, sum kristindómurin kann hava havt í hesum, at vit ikki geva okkum far um, at umhvørvið ella náttúran ikki tolir eina og hvørja viðferð. Hann heldur, at umhvørvisliga kreppan, sum tá var staðfest, fer at versna, um vit ikki sleppa kristna uppáhaldinum, at náttúran bara er til fyri at tæna okkum menniskjum, hetta sum hann kallar ortodoksa kristiliga arrogansu ella hugmóð. Nakað sum eisini kann hava sín uppruna í 1. Mósebók, tá ið Gud vælsignaði tey fyrstu menniskjuni og segði: nørist tit og fjølgist og fyllið jørðina og leggið hana undir tykkum! Og her hevur vísindin, vinnan og helst eisini politikkur spælt við. Uppáhaldið er, at náttúran er til fyri okkara skuld.

Tað er vert at geva gætur, at henda greinin hjá Lynn White varð skrivað langt áðrenn, nakar grunaði nakað um komandi veðurlagsbroytingar elvdar av mannaávum. Men niðurstøðan má so vera, at veðurlagskreppan verður ikki loyst bara við tøkniligum loysnum, men eisini við átrúnaðarligum - fyrst og fremst at vit broyta hugburð og ásanna, at her hava eisini kristin eina stóra avbjóðing.

Eg havi ikki hoyrt so nógv til tað í Føroyum, men í útlondum siga nógv ung, at vit eldru fyrilitarleyst hava notið fyrimunirnar av tí modernaða samfelagnum, teirri tøkniligu menningini og vælferðini, meðan tey ungu nú fáa upptakið og ikki kunna vænta sær at liva á sama góða hátt sum vit.

Og hvussu við teimum fátæku? Í sama Jákupsbrævi (kap. 2, v. 5) verður mint á, at Gud hevur valt út hini fátæku sum arvingar til tað ríkið, sum hann hevur lovað teimum, sum elska hann. Og funnist verður at, at vit vanvirða tey fátæku. Kundi tað, t.d. verið, tá ið bankarnir ikki loyva teimum at seta búgv, ella at tey ikki klára at halda sama fína livistøði sum onnur, og hvat við stóra ójavnanum millum rík og fátæk mitt í allari framgongdini?

Og hvat skulu vit siga, nú tey eldru verða kallað ein byrða?

Eg meini so við, at her er nokk at taka støðu til. Og tað legst meira aftrat, sum vit hava dømi um seinastu tíðina; tað verið seg spurningurin um tolsemi og um víðkan av siðbundnum rættindum, sum eisini eru ein avbjóðing fyri kristin og kirkjuna, men sum eg tó ikki fari at umrøða her.

Lat meg skunda mær at siga, at nú eru tað ikki bara tey gudiligu, sum gera góðgerðir. Onnur standa ikki aftanfyri. Men teimum kristnu, ið eru salt jarðarinnar og ljós heimsins, er tað álagt.

## Eg eri siðbundin

Tá ið tað kemur til gudstænastu, eri eg av tí gamla skúlanum. Mær dámar, at deknagudstænastan eins og gudstænasta við presti, hóast henda er eitt sindur øðrvísi enn deknagudstænastan, eru lagdar í fasta skipan (liturgi).

Tá ið deknagudstænasta er, verður byrjað við inngangsbøn, síðan er bíbliulestur við brotum úr bæði Gamla og Nýggja Testamenti, evangeliið verður lisið undan lestri, og aftaná lestur eru lovprísan, bønir og at enda útgangsbønin. Ein týðandi partur er sálmasangurin við undirspæli á orgli, eisini for- og eftirspælið, og klokkarin kallar til gudstænastu og ringir út, tá ið liðugt er. Sum kunnugt reisir kirkjufólkið seg, tá ið lisið verður úr Bíbliuni.

## Ikki besta løtan

Tað er annars ikki besta løtan í hesum tíðum at taka við sum deknur. Alt bendir á, at tað ganga færri fólk í kirkju nú enn fyrr. Her, sum eg eri, ganga neyvan meir enn 10 % av fólkinum í bygdini javnan ella viðhvørt í kirkju. Summi ganga fast, onnur av og á, og nógv koma sjáldan ella ongantíð í kirkju. Vit eiga tó at minnast til, at tey eru fleiri, sum hoyra til onnur trúarsamfeløg ella samkomur og ganga har. Kortini eru í 2023 um 77% av okkum limir í fólkakirkjuni. At fólk velja at standa í fólkakirkjuni, men lata vera at ganga í kirkju, verður onkuntíð lýst við enska hugtakinum "believing without belonging", at vit trúgva, men eru ikki knýtt at ella brúka nakran átrúnaðarligan stovn.

At nakað er um hetta, síggja vit eisini í kanning, sum Heini í Skorini o.fl. hava gjørt, og sum vísir, at yvir 70% av teimum spurdu søgdu seg trúgva á Gud. Eitt tal, sum er væl hægri enn í okkara grannalondum, og yvir 60% søgdu seg trúgva á lív eftir deyða.

Tað er munur á hesum tølunum, um vit hyggja eftir kyni, bústaði, politiskari sannføring og aldri. Nevnast kann, at um 70% av teimum 45 ár og eldri leggja dent ella stóran dent á átrúnað, meðan bara nakað omanfyri 40% av teimum 18-29 ára gomlu svara tað sama. Her kunnu vit siga, at tey eldru eru frá eini aðrari tíð, tá ið átrúnaður var nakað natúrligt og viðkomandi, men eisini at eldri hava betri stundir og hug at viðurkenna sín kristindóm.

Hinvegin hevur verðsliggeringin (sekularisering) við sær, at átrúnaður sum heild hevur fingið minni týdning í gerandislívinum, men sanniliga er hann ikki horvin fyri tað.

Upplivingarnar eru so nógvar og ítrívini mong, netmiðlar fara við nógvari tíð, og nógv finna nú samleikan – onkur vildi kanska sagt sannleikan – aðrastaðnis enn í kirkjuni og samkomuhúsum. Nógv ung savnast tó í tí, vit kunnu kalla fríkirkjunum, har tað ofta er meira lívligt við eggjandi talarum og góðum tónleiki, meðan kirkjan av summum verður søgd at vera "turr og keðilig." Fyri meg ger hetta einki, tí hjá mær hevur tað



***Sørvágs kirkja***

týdning í eini tíð við nógvum vasi og skundi at kunna koma í kirkjuna til eina stilla stund at hugsavna meg.

## Ymisk sjónarhorn

Jákup Dahl (1878-1944), próstur hevur skrivað grein, sum stóð í Varðanum í 1944, um deknatænastuna í Føroyum, sum í roynd og veru er nakað serskilt. Dahl heldur, at fólk sjálv eru byrjað at lesa lestrar ella úr Bíbliuni og syngja sálmar ikki langt eftir trúbótina. Og kirkjurnar hava verið væl fleiri enn, tað vóru prestar, so helst hevur longu tá verið lisið í kirkjunum eisini. Vit vita, at lestrabøkurnar hjá Jesper Brochmand (1585-1652) komu sum gáva í allar føroyskar kirkjur í seinnu helvt av 18. øld eins og sálmabókin hjá Kingo (1634-1703). Og um tað mundið tykist deknagudstænastan at koma í fasta legu. Brochmandslestrarnir eru góðir og tiltiknir langir; alt ov langir eftir okkara máti. Men í hvussu er, hevur tað verið Brochmand, hóast aðrar lestrarbøkur eisini vóru, sum varð lisin mest sum út í eitt í eina øld ella longri og enntá onkuntíð líka upp til okkara dagar. Føroyskir lestrar hava verið lisnir helst seinastu 60-70 árini, og nú hava deknarnir fleiri føroyskar lestrabøkur at velja lestrar úr.

Í hesi greinini leggur Dahl dent á, at føroyingar við deknatænastuni líka frá byrjan hava havt høvi at hoyra lestrar hjá fremstu og mætastu kirkjumonnum í norðanlondum.

Deknar vórðu settir av prestunum; nú kirkjuráðunum. Dahl heldur, at deknurin mundi vera ein av frægastu monnunum í bygdini, sum dugdi at



*Jesper Brochmand (1585-1652). Lestrabókin Huus Postill hjá honum var ein tann mest brúkta lestrabókin í kirkjum bæði í Danmark og Føroyum heilt upp í 20. øld. Eitt eintak er til taks í Sørvágs kirkju.*

lesa, hevði gott orð á sær og var kirkjuliga sinnaður. Hetta sama er eisini galdandi fyri konur, tí nú eru nógv konufólk deknar. Í Sørvági eru vit fýra deknar, tvær konur og tveir menn. Dahl heldur, at deknatænastan hevur havt tann týdning, at tað hvønn einasta sunnudag og heiligdag alt árið hevur verið hildin gudstænasta í hvørji einastu kirkju í Føroyum. At fólk hoyrdu lestrar hjá fleiri prestum gjørdi, at átrúnaðarligi sjónarringurin varð størri, og innihaldið í Bíbliutekstunum verður betur fatað. Tað koma fram fleiri sjónarhorn. Hetta ikki fyri at taka nakað frá prestinum, sum sat í kallinum. Dahl sigur longu í 1944, at "tíðirnar eru broyttar, fólk eru øðrvísi, og tað er nógv, ið dregur burtur frá kirkjuni. Fólk ganga yvirhøvur ikki so nógv, so javnt og fast í kirkju, tá ið deknurin lesur, sum fyrr. Fólk vilja yvirhøvur heldur nú fáa orðið talað enn lisið. Tí dámar mongum betur at fara í missiónshúsið og hoyra menn tala enn at fara í kirkjuna og hoyra deknin lesa."

Hetta eru tó tvey sløg av kristiligari leikmannatænastu, men vit eiga ikki at taka annað fram um hitt, heldur Dahl.

Sjávur havi eg sannað hesi árini, eg havi verið deknur, at góðir lestrar eftir ymiskar høvundar eru við til at lýsa Bíbliutekstir úr ymsum sjónarhornum, so at ikki alt verður so avgjørt. Og høvuðsboðskapurin fer ongan veg fyri tað. Hetta ger tað eisini gevandi at vera deknur, og vónandi fær kirkjuliðið eisini gagn av hesum. So deknastarvið nýtist ikki at vera keðiligt ítriv hjá eldri fólki; yngri fólk kunnu eisini væl bjóða seg fram.

## Bókmentir

J. Dahl: Deknatænastan í Føroyum. Varðin bd. 23, 1944, s. 69-79.
Jákup Joensen: Lestur. Fyrilestur sum Jákup Joensen, próstur helt 11/12-1955. Dagblaðið 20. desember 1955.
Pól á Kletti: Kirkjan er bygdafólksins. Dimmalætting, 2. desember 1995.
Petur Kruse: Sørvágs kirkja. 1886-1986. Sørvágur, 1986.
Heini í Skorini o.fl.: Færøerne mellem religiøs vækkelse og sekularisering: En nordisk undtagelse bliver til. Økonomi & Politik nr. 1, 2022, s. 88-110.
Lynn White: The Historical Roots of Our Ecological Crisis. Science 155:1976, s. 1203-1207.

## Nakrar føroyskar lestrabøkur til fyrru og seinnu tekstarrøð

Gudmund Bruun: Ljósið rann av kærleiks runni. 1968.
J. Dahl: Í lýsing. 1934, og Meðan hildið verður heilagt. 1948.
David Johannesen: Andin og orðið. 2015, og Andin og lívið. 2015.
Lívið spratt av kærleiks rót. Lestrar úr Norðurstreymoy. Lagt til rættis Axel Tórgarð. 1995.
John S. Myllhamar: Orð títt er sannleikin. 2006, og Í fyrstuni var orðið. 2010.
Teg umtala og æra. Lestrar eftir prestar í embæti í Norðuroyggjum 1950-1999. Lagt til rættis Róland Høgnesen. 2003.



# ALMA PETERSEN 90 ÁR

***Tekstur: Gunnleyg Durhuus***
***Myndir: Klara Johannesen***




22. september í ár fylti Alma Petersen í Klaksvík 90 ár, og hevði hon ein góðan og hugnaligan føðingardag saman við familju, vinum og kenningum. Umboð fyri Landsfelag Pensjónista vóru eisini við.

Hóast høgan aldur, er Alma framvegis virkin og fylgir væl við í samfelagsviðurskiftum, har hon javnan heitir á politikarar og okkum í Landsfelag Pensjónista, um at gera ymiskt fyri at betra um viðurskiftini fyri pensjónistar.

Upp gjøgnum árini hevur hon havt ein virknan leiklut í at streingja á at fáa politikarnar at betra um fólkapensjónina, sum eisini er blivin betur.

## Eitt sindur um Almu

Alma er dóttir Gretu og Aksel Olsen. Hon er fødd og uppvaksin í Klaksvík.

Alma giftist Mikkjal Lenus úr Fugloy í 1956. Tey búsettust í Víkunum, og fingu tey fýra børn, Katrin, Gretu, Eliesar, sum andaðist í 1999, og Aksel.

Seinni fluttu tey oman á Stoksoyraveg, har Alma hevði handil í kjallaranum í eini 15 ár. Hon ynskti at hava handilin í kjallaranum, so hon slapp frá at fara út frá børnunum, tá hon skuldi til arbeiðis.

Í nógv ár hevur Alma seymað kitlar og onnur arbeiðsklæði fyri virkir og sjúkrahúsið. Tað er stutt síðan, hon gavst við hesum.

Alma hevur verið virkin innan Klaksvíkar Húsmøðrafelag og hon hevur verið nevndarlimur í Pensjónistafelagnum Hugna í Klaksvík. Alma var nevndarlimur í Landsfelag Pensjónista frá 2010 til 2018, tá hon ikki stillaði uppaftur. Í dag er hon limur í Eldraráðnum í Norðoyggjum. Alma er framvegis í gongd og hevur altíð nógv góð hugskot, sum hon áhaldandi fylgir, til hon fær sett tey í verk. Tey seinnu árini hevur Alma m.a. roynt at fáa sett á stovn eina eldraverju, har tey eldru og onnur kunnu biðja um ráð og hjálp. Alma kann gleðast um, at hetta málið nú er komið so langt sum í Løgtingið.

Vit gleðast saman við Almu, at hon framvegis er virkin og takka fyri ein deiligan føðingardag.



*Alma heldur røðu*



*Beate og Gunnleyg ynskja Almu tillukku*



***Nógv fólk vóru komin saman at hátíðarhalda 90 ára føðingardagin. Her heldur Beate røðu.***

*Mynd: Gunnleyg Durhuus*



***Beate, Finn og Elsebeth Mercedis hugna sær í føðingardegnum. Tey høvdu nógv aktuell evni at práta um, m.a. málið um eldraverju, sum í nógv ár hevur ligið fremst í huganum hjá Almu***

*Mynd: Gunnleyg Durhuus*

# Hjúnaskilnaðir í Norðoyum í 18. og 19. øld

**Gjøgnum søguna eru fleiri dømi um, at hjúnaløg hava verið óeydnusom. Orsøkirnar kundu vera so mangar, og at koma í hesa vanlagnu mundi vera eitt tað ringasta fyri eini hjún, sum annars skuldu hava alt saman gjøgnum lívið. Dømi eru um hjún, sum alla tíðina, ella partar av tíðini í hjúnalagnum, hava búð hvør sær.**

*Tekstur: Jógvan Ravnsfjall*
*Myndir: Norðoya Forminnissavn*

At ganga í hjúnalag var, (og er fyri fleiri enn), heilagt, har hjún yvirfyri Guði játtaðu at verða saman til deyðans skilnaðarstund. Tí var tað torført, um ikki at siga ógjørligt, at slíta eitt hjúnalag.

Skuldi hetta gerast, mátti prestur, umboðandi kirkjuna og hjúnasáttmálan, fyrst royna at fáa semju millum partarnar, so hjúnalagið kundi halda áfram. Um tað ikki eydnaðist, og annars annar ella báðir hjúnafelagarnir høvdu gjørt seg sekan í broti móti hjúnalógini, mátti verða gingið rættarliga vegin, har tað kanska endaliga kundi verða givið loyvi til hjúnaskilnaða. Í dag kunnu vit siga, at tað neyvan er í nakrari familju í Føroyum, har ikki hjúnaskilnaður er ella hevur verið.

Í hesi greinini skal eg viðgera tríggjar hjúnaskilnaðir í Norðoyum hetta tíðarskeiðið, tvinni hjún á Uppsølum og eini hjún á Kirkju.



*Jógvan Ravnsfjall*

Á Uppsølum er annað hjúnið Pól Jákupsson og Anna Lísbitta Jóhan-Berintsdóttir, og tað seinna Óli Kristjansson og Sára Rasmusdóttir. Á Kirkju eru tað Jóannes Jóannesson og Katrin Andrasdóttir.

Sambært Norsku lóg Christians V frá 1687, sum kom í gildi her í Føroyum 12. mai 1688, var tilskrivað í triðju bók, kapitul 18, grein 15, nær loyvi kundi verða givið til, at gift ektafólk kundu verða skild frá hvørjum øðrum. Tað var t.d.



***Mynd av Klaksvík í 1904. Niðasti parturin á myndini er Uppsalar. Húsini í Stovugarðinum eru húsini niðast í høgra horni við skorsteininum. Húsini á Dalinum eru tey eitt sindur til høgru fyri miðjuna, eisini við skorsteini***

vegna hor, av egnum ávum at fara frá makanum ella at verða søgd at vera óegnað sum ektafólk.

Tá Pól og Anna Lísbitta vórðu skild, var Norska lóg enn fult galdandi, men óvist er, eftir hvørjum lógum var gingið við teimum seinnu málunum.

Meðan hjúnavígslur, og tað, ið har til hoyrdi, lá til kirkjuligu embætini, lá hjúnaskilnaður undir versligum embæti. Tá ið Óli og Sára Sofía vórðu sundurlisin, varð málið viðgjørt hjá amtsembætinum.

## Pól og Anna Lísbitta

Pól og Anna Lísbitta vórðu gift í Hvalbiar kirkju 18. november 1750. Tey búðu tá á Hólum. Pól var slektaður úr Gerðum, f. uml. 1720, og Anna Lísbitta slektað úr Hvalba, f. uml. 1728. Árið eftir, at tey eru gift, festir Pól tvey-marka festið í Stovugarðinum á Uppsølum, og munnu tey tá búgva har tey næstu árini. Onkuntíð munnu tey tó búgva í Hvalba, tí ein sonur teirra er føddur har í 1761. Seinni flyta tey til Havnar, har Pól fór at arbeiða við Kongaliga handilin, og verður hann tá ofta skrivaður Poul Jacobsen Gierdum.

Hann gjørdist sýslumaður í Norðoyum í 1775 og var sýslumaður til 1803. Eftir at hann gjørdist sýslumaður búði hann í Stovugarðinum á Uppsølum. Anna Lísbitta búði fyri tað mesta í Havn.

Pól og Anna Lísbitta fingu fleiri børn, har ein sonur og fýra døtur vuksu til. Sonurin og tríggjar døtur fingu eftirkomarar.

Atvoldin til hjúnaskilnaðin millum Pól og Onnu Lísbittu var, at Pól í 1776 var klagaður fyri hor, tí hann hevði verið saman við gentuni Onnu Mikkjalsdóttir, f. 1754, úr Kunoy. Hon hevði tann 1. mars sama árið átt eina dóttur, sum Pól var pápi at. Anna giftist í 1784 við Tummas Tummasson í Miðstovuni í Árnafirði, og dótturin, hon hevði fingið saman við Póli, giftist á Uppsølum.

Á vártingi 25. mars 1776 vóru bæði dømd eftir lógini, sektargjald og at skrifta fyri presti. Sektin hjá Póli var stór, 1000 gyllin umframt 100 gyllin í sakarkostnað, meðan sektin hjá Onnu var lítil, 9 gyllin, tí hon onga ogn átti. Haraftrat skuldi Anna sita 4 dagar í fongsli, meðan Pól vildi søkja um kongaligt loyvi at sleppa undan fongsulsdómi. Kanska var tað tí, at um hann fekk fongsulsdóm, kundi hann rokna við at missa sýslumansembætið.
Árið eftir, í 1777, vóru Pól og Anna Lísbitta hjúnaskild.

Sambært Norsku Lóg kundi tann, sum var sekur í at bróta hjúnalógina og av tí varð hjúnaskildur, gifta seg upp aftur aftaná trý ár. Tað gjørdi so Pól, tá hann 30. oktober í 1782 gifti seg við Jóhonnu Jákupsdóttir Ziska, f. 1763, av Uppsølum. Tey vórðu trúlovað 23. juni sama ár, og Pól hevði við brævi frá 24. august fingið kongaligan uppreisn og loyvi at giftast uppaftur.

Pól og Jóhanna fingu eisini nøkur børn, har ein sonur og tvær døtur vuksu til og fingu eftirkomarar.

Pól doyði 7. november 1811, 91 ára gamal, sum tað stendur í Norðoya kirkjubók.
Anna Lísbitta var eftir hjúnaskilnaðin verandi í Havn, búði allarhelst saman við døtrunum.
Hon doyði sum 53 ár gomul 11. juli 1781.
Viðmerkt er tá í Suðurstreymoyar kirkjubók: "Var skilt fra sin mand."

## Óli og Sára Sofía

Óli og Sára Sofía giftust í Gøtu kirkju 29. juni 1847. Óli var tá einkjumaður, búsitandi á Uppsølum og Sára Sofía búði í Leirvík. Beint eftir, at tey vóru gift, búsettust tey á Uppsølum, á Dalinum, har Óli búði frammanundan.
Óli var føddur í Streymnesi uml. 1795. Vaks upp í Lítlustovu á Eiði, og var tað helst tí, at hann á Uppsølum varð kallaður Eiðis-Óli.

Sára Sofía var fødd um ólavsøku 1801. Hon var úr húsinum á Lutastaðnum í Leirvík.

Hjúnalag teirra, Óla og Sáru Sofíu, var stutt og barnleyst. Longu á heysti 1849, 13. september, verða tey sundurlisin, og hon flytir tá aftur til Leirvíkar. Meðan hon býr í Leirvík, má Óli gjalda fyri uppihaldið hjá henni har, tí hóast tey eru sundurlisin, er hon enn kona hansara.

Tað gongur ein tíð, til tey fáa fullan hjúnaskilnað, og í 1854 er øll vónin um, at tey koma saman aftur uppi hjá Óla. Tá fær hann Josias Matras, kongsbónda í Uppistovu á Norðoyri, sum tá var settur sýslumaður í Norðoyum, at skriva sær eitt brævkong, har hann biður um, at hjúnabandið við Sáru Sofíu verður sett úr gildi. Brævið er dagfest 6. juli 1854, og er soljóðandi:

*"Til Kongen*
*Under 13. september 1849 blev jeg således som den allerunderdanigst vedlagte af amtmanden over Færøerne meddelte bevilling udviser separeret i henseende til bord og seng fra min hustru Sara Sophie Rasmusdatter, og vi have således i 4 a 5 år levet adskilte fra hinanden.*

*Den uoverensstemmelse i gemytterne, som foranledigede mig til i sin tid at anholde om separationsbevilling, vedvarer imidlertid endnu, som af det allerunderdanigst vedlagte bevis fra Ole Olsen og Hans Olsen, dateret Lervig d. 31. desember 1853, kan erfares. Og da der altså ikke er noget håb om, at vi ville kunne leve lykkelig sammen påny, vover jeg næst at vedlægge en attest fra vedkommende sjælesørger om at den befalede geistlige mægling forgjæves har været forsøgt, at ansøge om at bemeldte ægteskab ved deres Maiestæts allerhøjeste bevilling allerunderdanigst må vorde ophævet. Om min anstændige vandel, såvel før som i hele separationstiden, vedlægger jeg allerunderdanigst min sjælesørgers og flere agtede mænds vidnesbyrd.*

*Allerunderdanigst*
*Ole Christiansen*
*m.p.p."*

Líkt er til, at kongur eftirlíkaði umbønini frá Óla, so tey vórðu hjúnaskild, tí tá ið Sára Sofía er deyð, stendur í Suðurstreymoyar kirkjubók: "Afdøde husmand Ole Christiansen fraskilte hustru af Upsalon, Vaag sogn." Beint eftir er í skiftiprotokollina deyði hennara innførdur, og har stendur skoytt uppí: "Ole Christiansen Lervig (skal verða Uppsalon) fraskilte hustru." Eisini eru tey bæði nevnd sum "fraskilt" í fólkateljingum.

Seinastu árini búði Óli í Niðristovu í Gerðum, har hann doyði 21. september 1862, 68 ára gamal, sum skrivað er í Norðoya kirkjubók.

Sára Sofía búði tey fyrstu og síðstu árini eftir hjúnaskilnaðin í Leirvík. Kanska búði hon aðrastaðni tíðina ímillum. Hon doyr á Amtssjúkrahúsinum í Havn 31. juli 1866, 65 ára gomul. Sára Sofía hevði ikki verið gift frammanundan, at hon giftist við Óla, men Óli hevði verið giftur fyrr.

Hann var í 1834 giftur við Onnu Elisabett Dánjalsdóttir, úr húsinum á Dalinum á Uppsølum, og búðu tey har ta tíðina, tey vóru gift. Anna Elisabett doyði í 1846 og Óli sat tá sum einkjumaður við tveimum smábørnum, eini gentu og einum dreingi. Tað elsta barnið hjá teimum, ein genta, var deyð tvey ár frammanundan. Sonur Óla og Onnu Elisabett giftist sum tilkomin og flytir seinni til Fugloyar at búgva.



***Mynd av Kirkjubygd 1911. Húsini Úti í Húsinum eru tey fremstu á myndini nakað til høgru fyri miðjuna, venda oman og niðan, og hava grótvegg suðureftir, har kálkað er millum steinarnar. Húsini Uppi á Reyni eru tey lágu triðovast á myndini. Tey hava skálkalág niðaneftir, endavegg úr gróti og timburskjøldur. Í skjøldrinum er eitt smalt vindeyga við seks rútum, og í grótvegginum er eitt við trimum rútum niðan móti skálkalágni.***

## Jóannes og Katrin

Jóannes og Katrin vórðu gift í Hattarvíkar kirkju 2. juli 1852. Tey vóru bæði av Kirkju, hann Úti í Húsinum og hon Norð í Húsinum. Jóannes var føddur í 1828 og Katrin í 1807.

Fyrstu árini í hjúnalagnum búðu tey Úti í Húsinum, barnaheiminum hjá Jóannesi. Væl av aldursmuni var á teimum og segðist, at tey ikki sótu so væl um sátt, so seinnu árini, áðrenn tey við sáttmála vórðu sundurlisin, búðu tey hvør sær, hann Úti í Húsinum og hon hjá bróðurdóttrini Uppi á Reyni, har hon eisini búði restina av lívi sínum. Tey vóru barnleys.

Tað gekk so illa við hjúnalagnum, at eftir fleiri semingsroyndir vórðu tey sundurlisin í 1860. Soleiðis er hetta greitt frá í dagbók varðveitt eftir læraran og løgtingsmannin Hans Dávid Matras:

*"Efter flere mislykkede forsøg om forening adskildtes ægteparet Johannes Johannesen og hustru Cathrine Andreasdatter med hensyn til*

*hus og ejendom, bord og seng den 29. maj 1860, hvorpå jeg som forligelseskommisær eller mæglingsmedlem og Zacharias Michelsen vare vidner.*

*Det document, som ved denne lejlighed imellem bemeldte ægtefolk blev oprettet, blev dagen efter, den 30. maj, af sognepræsten, pastor Feilberg, egenhændig bekræftet i begge ægtefolkenes og vidnernes overværelse. Hvorpå ægtefolkene med kys og fornøjelse tog afsked med hinanden.*

*Den 24. juni 1860 blev de ovenfor nævnte vidner indviterede til et tragtement hos Cathrine Andreasdatter, for den store velgjerning de havde gjort, ved at hjelpe hende ud af det fængsel, hvori hun havde levet hos sin mand, da hun nu først følte sig ret fri, glad og lykkelig."*

Jóannes hevði ikki langa ævi. Hann datt oman 27. mai 1866 og doyði, 37 ára gamal.

Í kirkjubókini er tá viðmerkt, at hann var giftur. Tað er sami presturin, Feilberg, sum í 1860 váttaði skjalið, har tey bæði, Jóannes og Katrin fóru frá hvørjum øðrum, ið nú Jóannes er deyður, viðmerkir, at hann er giftur. Einki stendur um, at hann er fráskildur.

Eftir hesum kunnu vit ganga út frá, at Jóannes og Katrin ongantíð rættarliga vóru hjúnaskild, men at tey við skjalinum í 1860 vóru sundurlisin, sundurskild bústaðarliga, sum tað eisini stendur í dagbókini hjá Hans Dávid.

Tá skiftið eftir Jóannes verður tikið upp í 1867 stendur, at Katrin frásigur sær rættin til møguligan arv. Eitt dømi um, at hon tá sum einkja hevur rætt at arva Jóannes, sjálvt um tey vóru farin frá hvørjum øðrum.

Katrin doyði 29. oktober 1882, 75 ára gomul. Tá er í kirkjubókini skrivað, at hon var einkja eftir mann sín Jóannes.

Sostatt er hetta enn eitt prógv um, at hesi bæði, Jóannes og Katrin, ikki vóru rættarliga hjúnaskild, men bert við skjali sundurlisin, sundurskild bústaðarliga.

Keldur
J. Símun Hansen. Tey byggja land I. Klaksvík 1971.
J. Símun Hansen. Tey byggja land IV. Klaksvík 1978.
J. Símun Hansen, Tey byggja land VI, Klaksvík 1980.
J. Símun Hansen. Tey byggja land VII. Klaksvík 1981.
Norðoya kirkjubók 1760 – 1892. Felagið Varðin 2020.
Eysturoyar kirkjubók 1687 – 1832. Felagið Varðin 2020.
Eysturoyar kirkjubók 1832 – 1892. Felagið Varðin 2020.
Norðstreymoyar kirkjubók 1789 – 1892. Felagið Varðin 2021.
Suðurstreymoyar kirkjubók 1757 – 1851. Felagið Varðin 2021.
Suðuroyar kirkjubók 1745 – 1892. Felagið Varðin 2022.
history.fo:
Suðurstreymoyar kirkjubók 1852 – 1875.
Fólkateljngar 1801, 1834, 1840, 1845, 1850, 1855, 1860, 1870 og 1880.
Skiftiprotokoll 1810 – 1812.
Skiftiprotokoll 1860 – 1866.
Skiftiprotokoll 1866 – 1869.
Festiprotokoll 1733 – 1755.
Vártingsprotokoll 1767 – 1777.
Dagbók eftir H. D. Matras. Norðoya Fornminnasavn.
Sjøl úr Uppistovu á Norðoyri, Matras-savnið. Norðoya Fornminnasavn.

# ELDRI OG VEÐURLAGSBROYTINGAR

**Íslendski forsetin, Guðni Th. Jóhannesson, setti norðurlendsku ráðstevnuna ”Seniors and Climate Issues - For Benefit of Both” 27. og 28. september í Reykjavík, har føroysk umboð eisini luttóku.**

***Tekstur: Beate L. Samuelsen***
***Myndir: Gunnleyg Durhuus***

Ein norðurlendsk ráðstevna um veðurlagsbroytingar var í Íslandi, har eisini Føroyar hevði tveir fyrilestrarhaldarar á skránni. Annar fyrilestrarhaldarin var Beate L. Samuelsen, forkvinna í Landsfelag Pensjónista, og hin var Ólavur Poulsen úr FNU, Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag.



***Annar fyrilestrarhaldarin var Beate L. Samuelsen, forkvinna í Landsfelag Pensjónista***

Stigtakari til ráðstevnuna, ið hevði heitið ”Seniors and Climate Issues – For Benefit of Both” (Eldri og veðurlagið – Báðum at gagni) var Norðurlandaráðið, har Ísland eigur formanssessin í løtuni.

Í flestu av hinum norðurlondum hava eldri, ommur og abbar, tikið seg saman í minni og størri bólkar, sum javnan hittast. Felags fyri hesar eldrabólkar er at skipa fyri ymsum almennum tiltøkum, har endamálið á ein friðarligan hátt er:

1. at avmarka veðurlagskreppuna,
2. at hava ráðstevnu við luttakarum úr øllum Norðurlondum, har greitt verður frá, hvat hevur verið gjørt, og hvat vit kunnu læra hvør av øðrum, og
3. gera frágreiðingar við tilmælum til landsins stjórnir.

Orsøkin til, at Landsfelag Pensjónista, sum ikki fæst við sjálvboðið veðurlagsarbeiði, var boðið við, komst av, at vit í Føroyum ikki hava slíkar eldrifelagsskapir, sum av sínum eintingum stríðast fyri avmarkingum innan veðurlagsbroytingar. Tí varð mælt til at fáa umboð fyri



***Sum fleiri aðrastaðni í Íslandi, so kókar vatnið í jørðini við nógvum dampi – serstakliga her á Reykjanesi, sum myndin vísir***

NFU við á ráðstevnuna, sum fór fram á enskum í Reykjavík dagarnar 27. og 28. september. Føroysku umboðini bæði løgdu fram frágreiðingar um hvør sítt virksemi og luttóku annars aktivt við í pallborðsfundum. Smærri arbeiðsbólkar vóru settir, har ymisk tilmæli vóru gjørd og síðani savnað saman. Úrslitið av tilmælunum verða almannakunngjørd áðrenn árslok.

At evnið um Eldri í Norðurlondum og veðurlagsbroytingar verður tikið í størsta álvara, var longu beinanvegin, tá ráðstevnan byrjaði. Tá trein sjálvur hin íslendski forsetin, Guðni Th. Jóhannesson, inn um dyrnar og bjóðaði vælkomin. Hann helt eina rimmar røðu, har hann í stuttum greiddi frá ymsum brotum úr íslendsku søguni, og hvussu alt var broytt frá fyrstu búsetingunum og fram til í dag, tá um tvær milliónir av fremmandum ferðafólki árliga vitja landið, sum hevur einar 400.000 íbúgvar. At enda nevndi hann orðatakið, sum eisini vit í Føroyum kenna væl: Ungur nemur, gamal fremur. Hann vendi tað á høvdið, soleiðis, " gamal nemur (lærir), ungur fremur".

Ætlanin er, at vit eldru skulu læra og stuðla teim ungu til frama fyri veðurlagið.

Um 40 umboð úr Norðurlondum, undantikið Grønland og Áland, tóku lut á ráðstevnuni, sum fór fram í Reykjavík. Semja var um at upplýsa um veðurlagstrupulleikarnar. Teir kunnu avmarkast við fyrst og fremst at minka um $CO_2$ útlátið við at brenna minni kol, olju og gass.

Leinkjur til stroyming av ráðstevnuni liggja á www.eldri.fo

***Hin fyrilestrarhaldarin var Ólavur Poulsen úr FNU, Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag***



# Lítil og ongin skattalætti til pensjónistar

**Í november 2023 legði landsstýrið fram uppskot um skattalættar og hækkingar í brennioljugjaldi og í egingjaldi til Heilsutrygd**

***Tekstur: Beate L. Samuelsen***

Sum sæst á yvirlitinum yvir skattalættar, so er ætlaði skattalættin sosialt skeivur, og gjógvin millum rík og fátæk gerst størri, tí lógaruppskotini geva teimum fátæku "molarnar", meðan tey ríku koma til "vældekkað borð".

Okkara limir, sum fáa fólkapensjón, fáa ein skattalætta millum 500 og 750 kr. um árið, ið er millum 42 kr. og 60 kr. um mánaðan, meðan t.d. tingfólk og onnur við hægri lønum, fáa 5.900 kr. um árið, ið er 492 kr. um mánaðan.

Niðanfyri er yvirlit yvir mánaðarligu inntøkuna hjá fólkapensjónistum eftir skatt og gjøld í 2024, har ongin onnur inntøka er enn fólkapensjón. Íroknað er ein ætlað hækking í fólkapensjónini og Samhaldsfasta millum 6.000 kr. og 7.000 kr. um árið, og harafturat "skattalættin":

So fyri okkara limir, sum eru fólkapensjónistar, er hetta ikki nakað sum kollveltir tilveruna, tí við aðrari hondini fáa vit 500-750 kr. í skattalætta og við hinari hondini verður kravt uml. 500 kr. í øktum brennioljugjaldi og upp til 800 kr. í egingjaldi til Heilsutrygd.

**Landsfelag Pensjónista hevur sent fíggjarnevndini hoyringssvar við m.a. hesum uppskoti til broytingar:**
Soleiðis, sum ætlaði skattalættin er settur saman, so eru tað tey við teimum hægru inntøkunum, ið fáa mest burturúr skattalættanum. Fyri at pensjónistar og onnur við lágari inntøku eisini kunnu fáa eitt sindur av skattalættanum, kundi skattalógin verið broytt soleiðis, at inntøkan uppá 65.000 kr., ið ikki verður skattað í landsskatti, verður broytt til t.d. 90.000 kr. Tað hevði givið ein skattalætta uppá 3.750 kr. um árið, og hetta hevði verið meira rættvíst.

| | Stakur fólkapensjónistur | Giftur fólkapensjónistur |
|---|---|---|
| **Fødd áðrenn 1953** | **13.403 kr./mð.** | **11.632 kr./mð.** |
| **Fødd 1953 og seinni** | **13.421 kr./mð.** | |

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

| Inntøka | | Landsskattur | | | Skattalætti | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| um árið | um mánaðin | 2023 | 2024 | 2025 | 2023 | 2024 | 2025 |
| 120.000 | 10.000 | 8.250 | 7.700 | 7.150 | - | 550 | 1.100 |
| 140.000 | 11.667 | 11.250 | 10.500 | 9.750 | - | 750 | 1.500 |
| 160.000 | 13.333 | 14.250 | 13.300 | 12.350 | - | 950 | 1.900 |
| 180.000 | 15.000 | 17.250 | 16.100 | 14.950 | - | 1.150 | 2.300 |
| 200.000 | 16.667 | 20.250 | 19.100 | 17.950 | - | 1.150 | 2.300 |
| 220.000 | 18.333 | 23.250 | 22.100 | 20.950 | - | 1.150 | 2.300 |
| 240.000 | 20.000 | 26.500 | 25.100 | 23.950 | - | 1.400 | 2.550 |
| 260.000 | 21.667 | 30.500 | 28.100 | 26.950 | - | 2.400 | 3.550 |
| 280.000 | 23.333 | 34.500 | 31.100 | 29.950 | - | 3.400 | 4.550 |
| 300.000 | 25.000 | 38.500 | 35.100 | 32.950 | - | 3.400 | 5.550 |
| 320.000 | 26.667 | 42.500 | 39.100 | 35.950 | - | 3.400 | 6.550 |
| 340.000 | 28.333 | 47.000 | 43.100 | 39.450 | - | 3.900 | 7.550 |
| 360.000 | 30.000 | 52.000 | 47.100 | 43.450 | - | 4.900 | 8.550 |
| 380.000 | 31.667 | 57.000 | 51.100 | 47.450 | - | 5.900 | 9.550 |
| 400.000 | 33.333 | 62.000 | 56.100 | 51.450 | - | 5.900 | 10.550 |
| 420.000 | 35.000 | 67.000 | 61.100 | 55.450 | - | 5.900 | 11.550 |
| 440.000 | 36.667 | 72.000 | 66.100 | 59.450 | - | 5.900 | 12.550 |
| 460.000 | 38.333 | 77.000 | 71.100 | 63.950 | - | 5.900 | 13.050 |
| 480.000 | 40.000 | 82.000 | 76.100 | 68.950 | - | 5.900 | 13.050 |
| 500.000 | 41.667 | 87.000 | 81.100 | 73.950 | - | 5.900 | 13.050 |
| 520.000 | 43.333 | 92.000 | 86.100 | 78.950 | - | 5.900 | 13.050 |
| 540.000 | 45.000 | 97.000 | 91.100 | 83.950 | - | 5.900 | 13.050 |
| 560.000 | 46.667 | 102.000 | 96.100 | 88.950 | - | 5.900 | 13.050 |
| 580.000 | 48.333 | 107.000 | 101.100 | 93.950 | - | 5.900 | 13.050 |
| 600.000 | 50.000 | 112.000 | 106.100 | 98.950 | - | 5.900 | 13.050 |
| 620.000 | 51.667 | 117.000 | 111.100 | 104.950 | - | 5.900 | 12.050 |
| 640.000 | 53.333 | 122.000 | 116.100 | 110.950 | - | 5.900 | 11.050 |
| 660.000 | 55.000 | 127.000 | 121.100 | 116.950 | - | 5.900 | 10.050 |
| 680.000 | 56.667 | 132.000 | 126.100 | 122.950 | - | 5.900 | 9.050 |
| 700.000 | 58.333 | 137.000 | 131.100 | 128.950 | - | 5.900 | 8.050 |
| 720.000 | 60.000 | 142.000 | 137.100 | 134.950 | - | 4.900 | 7.050 |
| 740.000 | 61.667 | 147.000 | 143.100 | 140.950 | - | 3.900 | 6.050 |
| 760.000 | 63.333 | 152.000 | 149.100 | 146.950 | - | 2.900 | 5.050 |
| 780.000 | 65.000 | 157.000 | 155.100 | 152.950 | - | 1.900 | 4.050 |
| 800.000 | 66.667 | 162.000 | 161.100 | 158.950 | - | 900 | 3.050 |
| 820.000 | 68.333 | 168.000 | 167.100 | 164.950 | - | 900 | 3.050 |



# VITJAN HJÁ ELDRAFELAGNUM VESTURSKIN

**Eldrafelagið Vesturskin v. Páll Hellu, formanni, bjóðaði umboðum fyri Landsfelag Pensjónista á vitjan í Vestmanna ein mikudag, tá pensjónistarnir vanliga savnast í gomlu sýslumanshúsunum í bygdini.**

***Tekstur og myndir: Gunnleyg Durhuus***

Nógv fólk var komið saman hendan illfýsna mikudagin, tá forkvinnan, Beate L. Samuelsen saman við skrivaranum, Gunnleyg Durhuus, frá Landsfelag Pensjónista, komu á vitjan. Blíðskapurin var stórur, har byrjað var við kaffi, bollum og køkum. Tað var sera hugnaligt at møta nógvum kendum fólkum, ið vit ikki hava sæð í nógv ár.

Endamálið við vitjanini var at geva kunning um arbeiðið hjá Landsfelag Pensjónista og fáa eitt tættari samband millum limirnar í Vesturskin og Landsfelagið.

Beate L. Samuelsen, forkvinna, greiddi frá endamálinum hjá Landsfelagnum og í stuttum, hvat Landsfelagið hevur havt av uppgávum seinasta árið. Hon greiddi m.a. frá teimum síðstu lógaruppskotunum í Løgtinginum, har

Landsfelagið hevur verið til hoyringar í Fíggjarnevndini og Trivnaðarnevndini fleiri ferðir.

Tað hevur verið nógv arbeitt við lógaruppskotinum um mótrokning í arbeiðsinntøku fyri pensjónistar og lógaruppskotinum um skattalættar, har ætlanin tíverri er, at pensjónistar ikki fáa nógvan lætta í mun til tey við hægru inntøkum. Harafturat er ætlanin hjá Heilsutrygd at hækka egingjaldið fyri heilivág, ið eisini rakar pensjónistar meint.

Landsfelagið hevur sent fleiri tíðindaskriv út fyri at gera vart við ymisk viðurskifti hjá pensjónistum.

Nógvir spurningar vóru settir og fingu vit eitt gott kjak hendan seinnapartin.







# Norðurlendsk eldrafeløg glefsa frá sær

**Herfyri samdust limafeløgini í NSK, Nordisk Samarbets Komité, har Landsfelag Pensjónista er limur, at senda eitt felags áljóðandi skriv til allar stjórnir í limalondunum. Í felagsskrivinum verður heitt á Føroya Landsstýri um at hækka fíggjarliga stuðulin til góða tannheilsu hjá eldri fólki.**

*Tekstur: Beate L. Samuelsen*

Í norðurlondum hava vit leingi verið errin av vælferðarskipan okkara og evnum okkara, at verða før fyri at veita eina dygdargóða og høgliga heilsu- og sjúkrarøkt til fólkið, ið her býr.

Vælferðin, ið hevur við sær, at borgararnir hava rætt til røkt, alt eftir tørvi, hevur í mong ár verið tikin fram sum ein fyrimynd fyri restini av heiminum. Tað eru ógvuliga fá lond, ið hava eitt eins gott og væl framkomið fíggjarligt trygdarnet, sum hevur verið stýrt av virðunum, sum vit, har øll eru virðismett eins, og øll skulu hava somu møguleikar.

Norðurlendska vælferðarmodellið hevur í stóran mun givið sítt íkast til at útjavna fíggjarliga ójavnan millum borgararnar. Men tannrøktin hevur ikki reiðiliga fylgt við. Um tú gerst sjúkur í munninum, skalt tú gjalda ein stóran part av útreiðslunum sjálv/ur. Tað sleppur tú undan, um tú verður rakt/ur av aðrari sjúku.

## Verandi skipan innan tannrøkt

Óskiljandi er, at hvørki tenn ella muður verða mett sum partar av kroppinum, eftir sum hetta eru partar, ið hoyra til kroppin eins og allir aðrir partar av likaminum.

Úrslitið av, at hava tvær ymsar skipanir, eina, ið er galdandi fyri tenn, og eina aðra, ið er galdandi fyri restina av kroppinum, kann fáa stórar fylgjur fyri bæði einstaklingin og samfelagið.

***Øll skulu hava ráð at hava heilsugóðar tenn, og ikki bara tey, sum hava ráð at gjalda fyri kostnaðarmiklar viðgerðir.***

Í dag er góð tannheilsa vorðin tekin um stættarmun. Kostnaðurin er høgur. Tað merkja serliga tey og teir bólkar, sum ikki hava so nógvan pening um hendi. Tað vísir seg haraftrat, at bólkurin, ið er ringast fyri í so máta, er tann, ið telur eldri kvinnur og sum búgva einsamallar.

## Avleiðingar av vantandi tannrøkt

Okkara felagsskapir hava óteljandi dømir um



limir, sum av fíggjarligum orsøkum velja tannrøktina frá. Vit hoyra frásagnir um, at limir skammast yvir at hava vánaligar tenn, og at tað er orsøkin til, at hesir somu halda seg burtur frá sosialum virksemi, eftirsum teir ikki hava ráð at gera nakað við sjónlig tekin um vantandi tenn. Summir limir óttast fyri, at onnur merkja ringa munnluktin, ið stavar frá varandi ígerðum. Hjá øðrum er tað ein trupulleiki at eta, tí tey hava so ilt í tonnunum. Samanumtikið økir hetta um vandan fyri sosialari útilokan og eini alsamt vánaligari heilsustøðu, tá man er noyddur at raðfesta munnheilsuna lægri. Eitt annað, sum hevur

minst líka so stóran týdning, er sjálvsálitið, tá man ikki hevur ráð til at fáa ta tannpleygu, man hevur so harðliga brúk fyri.

Umframt omanfyri nevndu dømir vísir ein gransking, at samanhangur er millum munnheilsu og aðrar medisinskar trupulleikar. Tað finnast fleiri og ógvuliga skilagóðar ritgerðir um mistar tenn og miðvísar sjúkur sum diabetes og hjartaæðrasjúkur. Nágreiniliga orsøkin er enn ikki heilt prógvað, men týðiliga sæst, at ein góð tannrøkt alt lívið hevur stóran týdning fyri almennu heilsuna og lívsgóðskuna hjá eldri fólki. Um landið letur fíggjarligan stuðul til tannrøkt, sum gevur øllum sama møguleikan at fáa neyðugu røktina, sum vit í veruleikanum hava brúk fyri, kunnu vit fyribyrgja heilsutrupulleikum og minka um fíggjarligu strongdina, sum standast kann av tannlæknarokningum.

## Uppskot til betran

Tað er ein langskygd íløga at gera tannrøktina hjá hvørjum einstøkum bíligari, heldur enn at talan er um eina útreiðslu. Tað kann veita samfelagnum stórar sparingar at fyribyrgja álvarsligum heilsutrupulleikum við eini tíðligari og regluligari tannrøkt. Færri bráðneyðugar tannlæknavitjanir og ein minkandi tørvur á kostnaðarmiklum medisinskum inntrivi kunnu enda við eini meiri varandi og útreiðslueffektivari heilsu- og røktarskipan, fyri ikki at tosa um eina størri lívsgóðsku hjá hvørjum einstøkum menniskja.

Okkara átta norðurlendsku pensjónista- og eldrafeløg krevja sterk politisk tiltøk, so muður og tenn eisini verða javnmett sum ein partur av kroppinum og, at hesin parturin av likaminum kemur undir vanliga sjúkrarøkt. Tað er í tøkum tíma at taka stigið móti einum øktum fíggjarligum stuðuli til tannrøkt, so fólkaheilsan og heilsuligu javnrættindini styrkjast í øllum Norðurlondum. Hetta fer at minka um heilsuliga ójavnan.



Norðurlond liggja alra ovast, tá tað kemur til altjóða kanningar, ið snúgva seg um opinleika, álit og eydnusemi. Men tá tað kemur til nakað, vit hava lært, so er tað, at vit ikki bara eru nøgd, men at vit alla tíðina eru noydd til at betra um skipanir okkara fyri at fylgja við teim krøvum, ið samtíðin krevur.

Nýggjar broytingar mugu til fyri at verja okkara norðurlendska vælferðarmodell. At seta í gildi nýggjan almennan fíggjarligan styrk í Norðurlondum, hevði gjørt tannrøktina meiri atkomiliga hjá øllum, uttan mun til inntøku. Hetta hevði verið eitt uppaftur størri stig rætta vegin móti einum heilsuligum javnstøðukendum samfelag. Tað er eitt stig, sum ikki einans gagnar tí einstaka, men øllum samfelagnum langskygt. Ein íløga í framtíðina.

# ÁRSFRÁGREIÐING VÁRIÐ 2022 TIL VÁRIÐ 2023

***Tekstur: Beate L. Samuelsen***
***Myndir: Gunnleyg Durhuus***

Sum eitt frávik frá undanfarnum aðalfundum skipaði nýggja nevndin seg ikki beint aftaná aðalfundin á vári 2022, av tí at onkur nevndarlimur ikki var hjástaddur. Ikki fyrr enn á fyrsta nevndarfundinun aftaná summarfrítíðina 12. august, skipaði nevndin seg. Beate L. Samuelsen varð afturvald sum forkvinna og Ingeborg Vinther sum næstforkvinna.

Eitt hitt fyrsta málið var at fyrireika Eldradagin saman við nevndini í Eldrafelagnum Fjallinum í Leirvík. Dagurin var hildin 2. september 2022 í Bygdarhúsinum har. Men fyrst av øllum var ein stutt løta við tøgn hildin í sambandi við, at minnast fyrrverandi formannin í Eldrafelagnum Fjallið, Jón úr Konoy, sum andaðist nakrar dagar undan Eldradegnum.

## Góð kunngerð

Góð tíðindi vóru at frætta, tá táverandi landsstýrismaður í almannamálum, Sólvit Nolsøe, kom við eini hentari kunngerð á heysti 2022. Sambært henni fáa avvarðandi, ið eru ansarar hjá pensjónistum, sum ikki klára seg sjálvar, eina lønarhækkan uppá góðar kr. 7.000,- um mánaðin frá 1. januar 2023. Higartil hevur henda upphædd verið kr. 10.789,-. Nú er hon kr. 18.000,-.

Um so er, at talan er um tveir pensjónistar, t.d. eini hjún, ið mugu ansast og krevja pleygu í egnum heimi, fær hjálparfólkið ikki tað dupulta, men eina eyka upphædd kr. 5.000,- aftrat teim 18.000,- krónunum. (Hetta uppskot tók nýggja samgongan, ið kom til valdið beint undan jólum 2022 ikki undir við og sostatt fall uppskotið).

## Koppsetingar

Í september var fundur í Heilsumálaráðnum, har Landsfelag Pensjónista var spurt um, hvussu vit kundu hugsa okkum at betra um umstøðurnar, tá fólk verða koppsett móti Covid-19 o.ø. í framtíðini.

Trupulleikin hjá heilsumyndugleikunum veturin 2022/2023 hevur verið at fáa vakt áhugan hjá eldri fyri 4. Korona-prikinum, umframt koppseting móti herviligu krímsjúkuni, sum hevur gingið.

Ikki tí, fleiri av okkum, sum eru koppsett móti øllum hesum, hava eisini verið rakt, og fleiri hava verið ógvuliga álvarsliga sjúk. Men spurningurin er, um støðan ikki hevði verið munandi verri, um vit ikki vóru koppsett.

Eitt av okkara uppskotum var, at heilsumyndugleikarnir í transportablum koppingarstøðum fóru út á smábygdirnar, har t.d. eingin almenn ruta er. Í hesum nærumhvørvum kundi verði lættari at fingið fatur á eldri borgarum, sum fegnir vildu lata seg koppseta, men ikki annars fingu hetta upp í lag, tí ov trupult var at koma til og úr bygdini til nærmasta koppingarstað. Eitt annað uppskot frá okkum var, at heilsumyndugleikarnir seta seg í samband við t.d. lokal pensjónista- ella eldrafeløg, diabetesfeløg, røktarheim og støð, har eldri fólk hittast.

## Endurvenjingartilboð

Landsstýrismaðurin í heilsumálum setti í 2022 ein arbeiðsbólk við umboðum fyri Almannaráðið, Heilsumálaráðið og Kommunufelagið. Endamálið hjá arbeiðsbólkinum var at finna útav, hvussu støðan er hjá sjúklingum, tá teir verða útskrivaðir av sjúkrahúsum og skulu hava endurvenjing, og hvussu teir uppliva endurvenjingarsamstarvið, sum eigur at virka optimalt millum hesar tríggjar stovnarnar.

Fyri at vita, hvussu støðan var, tá tað kom til eldri sjúklingar, vendi arbeiðsbólkurin sær til Landsfelag Pensjónista fyri at vita, hvørja vitan, vit lógu inni við.

Fyri at lýsa endurvenjingarstøðuna so rætta, sum yvirhøvur gjørligt, vendu vit okkum beinleiðis til fleiri pensjónistar, sum kravdu endurvenijng eftir sjúkrahúsviðgerð fyri nágreiniliga at frætta, hvørjar upplivingar teir høvdu hesum viðvíkjandi.

Fleiri høvdu ongar trupulleikar havt við tilboðunum. Heilsuverkið hevði veitt alla ta neyðugu hjálpina líka frá tí, viðkomandi vóru útskrivað av sjúkrahúsum og til dags dato. Alt riggaði, sum tað skuldi. Hesi fólkini høvdu einki at finnast at. Men so vóru onnur, sum máttu stríðast og strevast fyri at kunna sleppa til endurvenjingar. Sera óheppið var, um viðkomandi ikki kundi koyra bil sjálv/ur t.d. vegna mjadna- ella knæskurð, ella tí viðkomandi hvørki hevði koyrikort ella bil í húsinum.

T.d. var onkur, sum noyddist at fáa onnur at koyra seg til og frá endurvenjingarstøðunum. Fyri ikki at troytta avvarðandi við hesum, slepti viðkomandi tískil endurvenjingini aftaná at verða komin heim.

## Eldraøkið hart rakt

Landsfelag Pensjónista hevur havt eina nýggja kunngerð til hoyringar frá Almannaráðnum, har kostnaðurin innan alt eldraøkið hækkar, bæði tá tað snýr seg um heimahjálp, røktarheimsbúpláss o.s.fr.

Liviumstøðurnar er vorðnar munandi kostnaðarmiklari í dag enn frammanundan. At tað eisini rakar eldraøkið, og at húsaleigan hjá búfólkunum somuleiðis hækkar, slepst ikki undan. Tað skilja vit væl.

Men eitt mark má verða, hvussu nógv húsaleigan hjá búfólki á røktar- og ellisheimi kann hækka.

Sambært galdandi lóg gjalda búfólk eina ávísa peningaupphædd um mánaðin sambært eini



***Formansfundur fór fram á Hotel Djurhuus Yviri við Strond. Her leggur Ingeborg Vinther fram málið um eftirlit á røktarheimum***

serligari gjaldingarskipan. Hann ella hon, sum hevur lægstu inntøku, skal gjalda lægstu upphædd, meðan pensjónisturin, sum hevur hægstu inntøku, skal gjalda mest.

## Livikostnaðurin hækkaður

Soleiðis, sum fíggjarumstøðan er runt um í útheiminum, har alt er farið upp, er eisini livikostnaðurin í Føroyum hækkaður ógvuliga nógv. Pensjónin, vit fáa, røkkur ikki til nakað sum helst. Allar gerandisvørur hækka framvegis. Húsarhaldsoljan eisini. Og ikki at gloyma prísurin á matvørum og tænastum.

Landsstýrissamgongan, sum ráddi fyri borgum í næstan fýra ár, gjørdi stutt undan løgtingsvalinum 8. desember 2022, tá nýggj samgonga tók við, av at hjálpa húskjum, sum vóru illa fyri, orsaka av príshækkingum.

Millum teirra, sum kundu fáa eitt eingangs peningaískoyti, vóru pensjónistar, ið kundu fáa kr. 7.000,-. Peningurin var oyramerktur til høgu oljuútreiðslurnar. Men peningurin kom ikki av sær sjálvum inn á kontoina hjá fólki. Søkjast skuldi um oljustudningin, og fleiri krøv skuldu lúkast, um tú sum pensjónistur yvirhøvur kundi gera tær nakrar tankar um at fáa lut í fíggjarliga oljuútreiðsluhjálpini.

Fyri tað fyrsta mást tú ikki hava eina árliga inntøku oman fyri kr. 290.000,- , og tú mást ikki hava meiri enn kr. 50.000,- standandi á bók.

Hesi sera strongu krøv, ið verða sett til ein pensjónista-umsøkjara, gera, at millum 80% og 90% av okkara málbólki ikki hava møguleikan at fáa eina einastu krónu til hækkaðu oljuútreiðslurnar.

Tá Almannamálaráðið vendi sær til Landsfelag Pensjónista fyri at vita, hvat vit hildu um lógina, áðrenn hon varð samtykt í løgtinginum, svaraðu vit, at fyri tað fyrsta átti inntøkumarkið verið munandi hægri, og fyri tað næsta átti landsstýrið at strika krøvini í sambandi við lágu peningaupphæddina, sum kundi standa á kontoini.

Nógvir pensjónistar hava gjøgnum árini lagt sær nøkur oyru til síðis til verri tíðir og til møguligt viðlíkahaldsgjaldi av verandi bústaði. Skulu teir nú revsast fyri hetta? Sum eitt plástur uppá sárið var kontoupphæddarkravið hækkað úr teim upprunaligu kr. 30.000,- til kr. 50.000,-, tá málið varð samtykt í løgtinginum.

## NSK í Bommersvik

NSK-fundur var 26. og 27.oktober 2022 í Bommersvik, sum liggur eitt sindur sunnanfyri svenska høvuðsstaðin Stockholm. Umframt vanliga nevndarfundin, vóru eisini tvey seminar hildin. Endamálið við teimum var, at limalondini í NSK skulu vera við til at rættvísgera fíggjarligu umstøðurnar hjá eldri fólki og at vit m.a. á ein betri hátt skulu hava møguleikan at útnytta arbeiðsorku okkara í hesum høpi.

Ein partur av arbeiðinum er at kunna limalondini um hetta og stuðla hvørjum øðrum at betra um viðurskiftini hjá pensjónistum.

Luttakararnir vóru samdir um at minka um aldursdiskrimineringina, sum pensjónistar í øllum limalondum uppliva. Sum dømi upplýsti Landsfelag Pensjónista, at alment sett starvsfólk í Føroyum verða uppsøgd, tá tey fylla 72 ár. Í hinum limalondunum er einki aldursmark fyri uppsøgnum.

Eitt annað felags áhugamál var, at vit mugu vita, hvat vit sum  eldri kunnu vænta okkum í framtíðini.

Komandi NSK-fundurin verður í Reykjavík 3. og 4. mai 2023.

## Ársveitslan 2022

Leygardagin 5. november hevði Landsfelag Pensjónista ársveitslu á Hotel Føroyum við døgurða og nógvum góðum vinningum. Ólavur Højgaard, Holgar Jacobsen og Niels Olsen spældu bæði undir borðhaldinum og til dansin. Høvuðsvinningurin var eitt gávubræv frá Smyril Line áljóðandi kr. 6.000,-. Gestarøðari var Erhard Jacobsen, formaður í Vága Pensjónistafelag. Luttøkan var góð, 300 fólk luttóku. Orðstýrari var Árni Gregersen.

## Eldradagurin 2023

Og so er tað árligi Eldradagurin. Hann hevur Pensiónistafelagið í Havn fyri fyrstu ferð nakrantíð átikið sær at skipa fyri saman við Landsfelag Pensjónista. Hann verður leygardagin 9. september í Dansifrøi í Gundadali. Hvar og nær Ársveitslan 2023 hjá Landsfelag Pensjónista verður í ár, er ikki avgjørt enn. Vit stíla í hvussu er fram ímóti, at hon verður einaferð í heyst, møguliga í november.




***Fysioterapeuturin, Jákup Petur Eliassen, greiddi á formansfundinum á Hotel Djurhuus við myndum, dømum, tølum og strikumyndum fá stóra týdninginum hjá eldri fólki at venja.***

**Formansfundur**

Aftaná at hava ligið í dvala í tvey ár vegna Koronu, var formansfundur hildin á Hotel Djurhuus, Yviri við Strond, hin 24. januar 2023. Luttøkan var góð. 28 umboð fyri tey 16 limafeløgini møttu.

Sirið Stenberg, nýggja landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, greiddi m.a. frá ætlanum hjá samgonguni innan pensjónista-/eldraøkið. Hon upplýsti, at samgongan ongar ætlanir hevur at strika mótrokningina í pensjónini við arbeiðsinntøku hetta valskeiðið, men at arbeitt verður við møguliga at hækka núgaldandi upphædd upp til kr. 60.000,- og at hon kanska einaferð við tíðini kann koma uppá kr. 100.000,-.

Hetta er sambært Landsfelag Pensjónista ikki í lagið, tí vit vilja hava mótrokningina strikaða. Tað er eitt av okkara høvuðsynskjum og nakað, ið vit leggja dent á, sum støðan er. Orsøkin er, at pensjónistar, sum hava orku og hug, skulu hava møguleika at vinna sær pening uttan at verða mótroknaðir í pensjónini.

Somuleiðis kunnu vit sum pensjónistar bøta um vantandi arbeiðsmegina, sum samfelagið skríggjar eftir í hesum tíðum og tískil noyðist at leita eftir arbeiðsfólki úr øðrum londum.

**Mótrokningin**

Her kann líka leggjast aftrat, at nevndin í Landsfelag Pensjónista hósdagin 20. apríl 2023, var á fundi við umboð fyri Trivnaðar-

nevnd løgtingsins í sambandi við lógaruppskot frá Sambandsflokkinum um at avtaka mótrokningina í pensjónini við arbeiðsinntøku hjá pensjónistum.

Við uppskotinum er ætlanin at gera tað meiri áhugavert fyri pensjónistar, sum hava áhuga, heilsu, orku og vilja til at arbeiða og taka eitt eyka tak- og harvið somuleiðis verða longri á arbeiðsmarknaðinum.

## Búskaparráðið

Nevndin hjá Landsfelag Pensjónista hevði ein áhugaverdan fund við formannin í Búskaparráðnum, Fróða Magnussen tann 21. apríl 2023. Endamálið var at seta seg nærri inn í fíggjarligu viðurskiftini í landinum í sambandi við eldraøkið og við okkara ynskir um, at fáa løgtingið at avtaka mótrokningina í pensjónini við arbeiðsinntøku.

## Vantandi eftirlit

Næstforkvinnan í Landsfelag Pensjónista, Ingeborg Vinther, sum eisini er forkvinna fyri Pensjónistafelagið í sunnaru helvt av Suðuroy, greiddi á formansfundinum í januar frá tí vantandi eftirlitinum á røktarheimum, sum vit framvegis stremba fram ímóti at fáa sett í verk. Forkvinnan í Heilsuhjálparafelagnum, Mary Antonsdóttir, kom við fleri uppskotum um, hvat gerast kann fyri at tálma trotið á arbeiðsmegi innan eldraøkið m.a. lønarhækkan.

Fysioterapeuturin, Jákup Petur Eliassen, greiddi við myndum, dømum, tølum og strikumyndum frá stóra týdninginum hjá eldri fólki at venja. At enda greiddi skrivari Landsfelag Pensjónista, Gunnleyg Durhuus, frá nýggju heimasíðu felagsins. Heimasíðan er meiri brúkaravinarlig og lættari at finna runt í enn tann gamla heimasíðan var.

Navnið er hitt sama, www.eldri.fo. Ein onnur orsøk til at fáa nýggja heimasíðu hevur verið ymsir trupulleikar, vit hava havt, og sum felagið Alnetið hevur hjálpt okkum at loysa. Hartil kemur, at Alnetið húsast undir somu lon sum Landsfelag Pensjónista í Løkjatúni 1 á Argjum.

## LP í Suðuroynni

Hálvan mars í ár skuldi nevndin í Landsfelag Pensjónista á vitjan í Suðuroynni. Tað hevur leingi verið eitt ynski hjá báðum pensjónistafeløgunum har, Pensjónistafelagnum Høft á Tvøroyri og Pensjónistafelagnum í sunnaru helvt av Suðuroynni, at fáa umboð fyri Landsfelag Pensjónista suður at greiða frá virksemi felagsins. Eisini skuldu Sirið Stenberg, landsstýriskvinna, og Heri Petersen, fulltrúi í Almannaráðnum, koma við á fundin.

Fundurin var settur at verða mikudagin 15. mars, men mátti avlýsast í síðstu løtu vegna stórkava. Fundurin er fyribils útsettur.

Blaðið Eldri nr. 7 kom út beint undan jólum. Upplagið er 1800 eintøk og síðutalið 64.

# AVSLÁTTARAVTALUR HJÁ LANDSFELAG PENSJÓNISTA

## NOVEMBER 2023

**Landsfelag Pensjónista hevur fingið nógvar góðar avsláttaravtalur við handlar, hotell, matstovur og aðrar fyritøkur.**

**Limirnir í teimum 16 lokalfeløgunum kring landið kunnu fáa avsláttur úr 5% upp í 35% av vørum og tænastum frá ymsum handlum, hotellum, matstøðum og øðrum fyritøkum kring landið.**

***Avslátturin er treytaður av, at limur vísir fram persónligt limakort frá Landsfelag Pensjónista.***

**Limirnir fáa limakort við at venda sær til sítt lokalfelag og nýggir limir við at tekna seg hjá lokalfelagnum.**

**Avsláttaravtalurnar liggja eisini úti á heimasíðuni www.eldri.fo.**

## Í Tórshavn

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Hoyrnin** | 10% | Av hoyritólum | 321731 |
| **Hennara**<br>Kvinnuklæðir | 10% | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 274075 |
| **Tignir - væl klæddir menn**<br>Mannfólkaklæðir | 15% | Av øllum vørum | 292900 |
| **Fótbúni**<br>Skósøla | 10% | Av øllum vørum | 311705 |
| **Gunnvá**<br>Kvinnuklæðir | 15% | Av øllum vørum | 214206 |
| **Toscana** | 10% | Mán. til hósd. og sunnudag | 211109 |
| **Angus Steakhouse** | 10% | Av øllum mati mánadagar | 717777 |
| **Hotel Hafnia** | 15% | Frokostbuffet í matstovuni og av øllum á Kafé Kaspar | 313233 |
| **Hornið, SMS** | 10% | Av øllum vørum | 233423 |
| **Fljóðið sp/f** | 10% | Av øllum vørum | 311718 |
| **Jógvan Weihe** | 10% | Av øllum vørum | 353897 |
| **Hjá Kissa**<br>Mannfólkaklæðir | 15% | | 311395 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Bailine** | **10%** | | 280554 |
| **Tórshavnar Maskinhandil** | **15%** | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 313442 |
| **Hitapumpur.fo** | **10%** | Av hitapumpum við montering.<br>Um 3 keypa saman | 212204<br>312204 |
| **Køtlum** | **20%** | Hárviðgerð | 312299 |
| **Touché**<br>Mótahandil | **10%** | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 603300 |
| **Nordcar** | **10%** | Av dekkum og felgum | 363738 |
| **P/F Waag** | **10%** | Av dekkum | 313666 |
| **SRI**<br>Máling | **10%** | Av øllum uttan glasvevi | 313030 |
| **in•tone clinic** | | Viðgerð við infrareyðum hitateppi<br>100 kr. Vødda- og pínuviðgerð 120 kr. | 516114 |
| **Salong Liljan**<br>Torfinsgøta 6 | **15%** | Hárviðgerð, mán.-fríggj. áðrenn kl. 13 | 314768 |
| **Kaffihúsið**<br>Bryggjubakki 14, Tórshavn | **10%** | Av øllum mati | 358787 |
| **Havgrím Seaside Hotel**<br>Yviri við Strond 14 Tórshavn | **10%** | Av øllum mati og gistingum | 201400 |
| **Muna v/Høgna Waag** | **10%** | Bókin "Mín lívsleið". Ókeypis útkoyring | 767601 |
| **Valdemar Lützen**<br>Byggibúð & Lásatænasta & Rustfrí<br>Heilsøla, Skálatrøð 14, Tórshavn | **15%** | Av øllum vørum | 301020 |
| **Marjun Wolles** | **15%** | Stjørnuløtur - Kærleikin gloymir ei<br>Fløga og tekstur | 271664 |
| **Hotel Djurhuus**<br>Yviri við Strond 19 | **10%** | Av mati og gisting | 355500 |
| **Fló Tøknihjálp** | **30%** | Av allari tøkniligari hjálp<br>(telefonir, teldir og teldlar, v.m.) | 227375 |
| **Thomas Dam á Hálsi**<br>Heykavegur 3 | **35%** | Av øllum vørum | 311400 |

# Í Vágum

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Unicar** | **10%** | Av øllum leigubilum | 263546 |
| **Frisørsalongin MidWay** | **15%** | | 213055 |
| **HA-bilar** við Hallur Berg | **10%** | Av arbeiðsløn upp á bilumvælingar | 220021 |
| **Salong Aura** | **15%** | Av arbeiðsløn, hárviðgerð | 215499 |
| **Nest,** kafé og matstova | **10%** | Av øllum mati | 308888 |
| **Ur og brillur** | **10%** | Av øllum brillum | 447950 |
| H-Dygd, vindeygu og hurðar | **10%** | Av øllum vørum | 322177 |
| **Carrent.fo**<br>Vága Floghavn | **10%** | Av øllum leigubilum | 783000 |

# Í Sandoy

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Búrhandilin** | 10% | Av tógvi og gávulutum | 361519 |

# Í Norðoyggjum

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Linsan Optik**<br>Stoksoyrarvegur 16 Klaksvík | 15% | Av brillustellum og -gløsum | 313133 |
| **Sjómansheimið**<br>Hotel Klaksvík | 10% | Av leigan av kømrum | 455333 |
| **JAP,** klædnabúð | 10% | | 456880 |
| **Vera Klipt** | 10% | Av allari hárviðgerð | 455677 |
| **Hvíthús** | 10% | Av klædnavørum | 455353 |
| **Seymistovan Hei-Mai** | 15% | | 457162 |
| **Leivur Ellingsgaard** | 10% | Ur, gull, silvur, brillur | 455203 |
| **Hjá Skós** | 10% | Av øllum skóm | 455057 |
| **Angus Steakhouse** | 10% | Av øllum mati mánadagar | 457777 |
| **El-in** | 5% | Av øllum vørum, undantikið tilboðsvørum | 284513 |
| **Norðoya Litbúð** | 15% | | 457300 |
| **Klaksvíkar Autolakering** | 10% | Av øllum vørum | 458787 / 288787 |
| **Bil & Dekkverkstaðið**<br>Við John Heinesen | 10% | Av øllum billutum | 456959 / 217861 |
| **Kósabúðin** | 10% | Av øllum vørum | 455000 |

# Í Suðuroy

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Hotel Bakkin** | 10% | Av øllum mati | 373961 |
| **Richard B. Thomsen & Søn**<br>**Timburhandil A/S** | 20% | Við kontantsølu | 661000 |
| **Glasstovan á Tvøroyri**<br>Tvørávegur 25 | 10% | Av øllum mati | 790064 |

# Í Eysturoy

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Diana** | 10% | Av øllum hondarbeiði og ítrivsvørum uttan toy til føroyska búnan, seymimaskinum og lampum | 448125 |
| **Ur og brillur** | 10% | Av øllum brillum | 447950 |
| **Rokoko,** klædnahandil | 10% | Av øllum klæðum | 441039 |
| **Brá,** mótahandil | 10% | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 422727 |
| **Shari,** mótahandil | 10% | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 454646 |
| **Skósøla** við Terje Hansen | 10% | Av øllum vørum | 441018 |
| **Josi,** klædnahandil<br>Við S. Danielsen | 10% | Av øllum klædnavørum og skóm | 441450 |

# YVIRLIT YVIR PENSJÓNISTA- OG ELDRAFELØGINI Í FØROYUM 2023

**Landsfelag Pensjónista**
**Løkjatún 1, 160 Argir, tlf. 219394,**
**t-post: lp@eldri.fo,**
**heimasíða: www.eldri.fo**

**Limafeløgini:**

**1. Pensjónistafelagið Hugni**
Ninni Olsen, forkvinna,
Stangavegur 138, 700 Klaksvík,
tlf. 455543 og 215543,
t-post: marjun.joensen@gmail.com
Limatal: 110 Felagið stovnað: 19.10.1971

**2. Eldrafelagið Fjallið**
Mai-Britt Jacobsen, forkvinna,
tlf. 280123, t-post: vidanna52@gmail.com
Limatal: 153 Felagið stovnað: 18.03.1991

**3. Eldrafelagið Borgin**
Toftagøta 9, Fuglafjørður,
Áshild Kristiansen, forkvinna,
Fjalsvegur 6, 530 Fuglafjørður,
tlf. 214621 og 580025,
t-post: ashild.kristiansen@skulin.fo
Limatal: 160 Felagið stovnað: 16.02.1985

**4. Oyndarfjarðar Pensjónistafelag**
Jørmund L. Juul, formaður,
Tartavegur 5, 690 Oyndarfjørður,
tlf. 211918, t-postur: jljuul@olivant.fo
Limatal: 20 Felagið stovnað: 02.10.1991

**5. Eldrafelagið á Toftum**
á Kneysum 14, Toftir,
Alfred Olsen, formaður,
Rókavegur 24, 656 Saltnes,
tlf. 447960 og 210960,
t-post: alfred-olsen@kallnet.fo
Limatal: 75 Felagið stovnað: 09.09.2015

**6. Eldrafelagið Nón**
Johild Joensen, á Byrgisheyggi 5, 627 Lamba,
tlf. 448738 og 288738,
t-post: johildjoensen@outlook.com
Limatal: 177 Felagið stovnað: 16.09.1987

**7. Eldrafelagið Kumlá**
Elias Hansen, formaður,
Skálavegur 92, 480 Skála,
tlf. 441188, t-post: eliassonja@gmail.com
Limatal: 57 Felagið stovnað: 15.02.1992

## 8. Pensjónistafelagið í Sjóvar Sókn

Petur Jákupsson, formaður, Skúlavegur 4,
490 Strendur, tlf. 257987
t-post: pj0106d7@skulin.fo
t-post: josi@kallnet.fo; martin@olivant.fo;
Limatal: 75 Felagið stovnað: 24.10.1988

## 9. Eldrafelagið á Eiði

Knút Vesturdal, formaður,
Korndalsvegur 26, 470 Eiði,
tlf. 423014 og 223525,
t-post: vesturdal@vesturdal.com
Limatal: 70 Felagið stovnað: 26.03.2009

## 10. Sunda Pensjónistafelag

Vibeke Ingvarsson, forkvinna,
Norðskálavegur 36, 460 Norðskáli,
tlf. 267346 og 422226.
t-post: v_ingvarsson@hotmail.com
Limatal: 64 Felagið stovnað: 03.02.1985

## 11. Pensiónistafelagið í Havn

Jógvan Johansen, formaður,
undir Kongavarða 14, 160 Argir.
Tlf. 228654,
Pensjónistafelagið í Havn, tlf. 284881,
t-post: pfh@eldri.fo
Limatal: 450 Felagið stovnað: 20.05.1976

## 12. Eldrafelagið Vesturskin

Páll Hellu, formaður, Niðari Vegur 69,
350 Vestmanna, tlf. 252054
t- post: hellupall@gmail.com
Limatal: 86 Felagið stovnað: 28.05.1984

## 13. Vága Pensjónistafelag

Erhard Jacobsen, formaður,
370 Miðvágur, tlf. 596147,
t-post: erhjac@gmail.com
Limatal: 152 Felagið stovnað: 30.11.1981

## 14. Pensjónistafelagið "Kvøldarsól"

Birgit Hentze, forkvinna,
240 Skopun, tlf. 361330,
t-post: birgithentze@gmail.com
Limatal: 7 Felagið stovnað: 29.04.1982

## 15. Pensjónistafelagið HØFT

Jens Johannesen, formaður,
Torvheyggjur 11, 825 Froðba,
tlf. 571770 og 371770,
t-post: jaj@kallnet.fo
Limatal: 30 Felagið stovnað: 28.12.1981

## 16. Pensjónistafelagið í sunnaru helvt av Suðuroy

Ingeborg Vinther, forkvinna,
Geilin 38, 900 Vágur,
tlf. 573427, t-post: vinther@mail.fo
Limatal: 60 Felagið stovnað: 19.09.1985



# Eldri


**Landsfelag Pensjónista**

Løkjatún 1 • FO-160 Argir
Tel: 21 93 94
T-postur: lp@eldri.fo
www.eldri.fo